# FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 293 | Hósdagur 15. mai 2003 | 10,-


Poul á Trøllanesi:

## Undangongumaður í revahaldi



Síða 20-21

# Fiskivinnuframsýningin

FF-blaðið var við á messuni í Runavík. Vit lýsa tað, sum hini bløðini ikki hava fingið við. Men niðurstøðan er tann sama: Føroyingar smæða seg ikki burtur.

Síða 22-24

# Føroyar og føroyingar í Hirtshals

Á páskatúri við Norrönu var FF-blaðið í Hirtshals, sum er merkt av føroyingum og Føroyum, hvar ein vendir sær. Og teir, sum standa afturfyri, eru fiskimenn, fiskivinnumenn og annars teir sum røkja sjógvin.

Síða 13-15

# Kirsten Jacobsen og Fisker-Kaj



Vit hava verið á ferð við fyrrverandi fólkatingsliminum Kirsten Jacobsen. Hvat enn kann sigast um hana, so hevur hon barst fyri tí minni menta manninum. Søgan um Fisker-Kaj er eitt gott dømi um, hvussu ein "fólksins tænari" eigur at virka. Vit hava eisini hitt Kaj.

Síða 5

Fiskimenn í Hirtshals:

## Vilja hava okkara fiskiskipan

Vit hava vitjað fiskimannafelagið í Hirtshals. Teir hava sítt at dragast við og vilja hava fiskidagaskipan.

Síða 9

## Kirkjan, sum var dømd at fara í havið

Síða 6

## Pávin á Syðradali

15 ára gamli Andrias á Syðradali savnar autografar. Hann hevur enntá fingið autograf frá pávanum!

Baksíðan 28


Tel: 471116
Fartel: 216270
BURÐARDYGGUR
Mustad®
FISKIREIÐSKAPUR
poul@kjolbro.com
24/7 tænasta

Alarmur - Skipsvakt - Vakt
Virðishandan - VIP
Náttarvakt - Sjónvarpansni
Atgongdskontroll
Trygdarráðgeving
ANSNI
211 112
Tín trygd fyri tryggleika

KÄRCHER
Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.
Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagota 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



29. apríl løgdu tveir krabbabátar upp her. Teir høvdu 24 og 25 tons fyri túrin. Smábátarnir, sum royna her um leiðir, siga frá ójøvnum døgum; tað er nógvur bleytur krabbi, sum teir blaka út aftur.

4. mai var stilli inni á og +3,2 stig, men úti á var greytasvart í toku. Eg fekk tíðindi frá einum skipara í Íslandi, sum eg kenni væl higani úr Grønlandi, og hann sigur í teldubrævi tann 29. apríl, at íslendskir rækjutrolarar hava havt gott fiskarí í síðstu viku á Dornbankanum. Teir hava fingið ímillum 10-20 tons í hálið, og støddin á rækjunum var góð – um 80 til eitt kilo, óført nú til dags.

6. mai stóð í Grønlandsposten, at nýggir krabbaprísir eru komnir í gildi. Prísurin er ásettur til 14 kr. fyri kilo. Um so skipið avreiðir yvir 10 tons, so verður eitt ískoyti uppá 50 oyru lagt omaná, og tað verða so løgd 50 oyru aftrat aftur, um skipið avreiðir yvir 20 tons. Hetta heldur á, til 60 tons eru avreidd, so 3 kr. verða lagdar omaná í síðsta enda, so skipið fær 17 kr. kg fyri livandi krabba. Hetta er ein avtala millum KNAPK og Royal Greenland. Í gjár og í dag hava tveir krabbabátar lagt upp, annar hevði 22 tons og hin 12 tons.

Sama dag lá ein gamal kenningur, "ALDAN", her. Hann fiskar krabba av ES-kvotu, og er tað Rógvi Joensen, úr Klaksvík, sum er skipari. "ALDAN" var farin úr Spaniu tann 5. mars, og vóru teir komnir í tríggjar stormar á veg til Grønlands. Teir komu til Nuuk tann 20. mars og løgdu pakkning upp, sum skal brúkast til árið, og so lógu teir og bíðaðu í 17 dagar og bíðaðu eftir fiskiloyvinum, sum lovað var teimum skuldi liggja fyri teimum, tá teir komu til Nuuk.

Loyvið kom tann 6. apríl, og so løgdu teir til havs. Fyrst fingu teir eina viku við illveðri, og so fingu teir bara drigið ein stubba, tá ein skái var eina løtu, men fingu ongan krabba. Hetta var suður út fyri Manitsok; teir fingu ikki verið longri norðri fyri ísi. Tað komu stór belti av ísi sendandi suðureftir, so teir mistu nakað av reiðsskapi, men so fingu teir nakað av krabba, 1-2 tons av lidnari vøru um dagin er ikki tað stóra, men brúkiligt. Krabbin er í hampiligum standi, men nakað myrkur í skelini (skitin, brúnur). "ALDAN" var inni í Nuuk tann 16. apríl við tveimum monnum.

Nú hevur verið nógv lágætt, sum er ring fiskiætt, men góð ætt at trýsta ísin NV-eftir. Onnur øki eru opnað, og rúmligari er blivið at seta. "ALDAN" kom inn í dag (6/5) við einum manni, og tríggir fóru umborð aftur. Teir hava gott 40 tons av lidnari vøru inni. Teir fóru avstað aftur seinnapartin.

7. mai var stilli inni á og -0,6 stig. Væl av vindi er úti til havs. "TARSERMIUT" kom inn til Sisimiut at landa. Teir hava gott 330 tons inni – slagið er brúkbart hjá teimum.

8. mai vóru –1,6 stig og stilli, men tað er komið eitt følv í nátt. "TARSERMIUT" fór nýggjan túr í kvøld. Tann 9. mai kom "SERMEERSUUT" inn higar at leggja 100 tons av sekkjarækjum upp. Teir fóru avstað aftur eftir miðnátt.

## Hesar áhugaverdu myndirnar frá Grønlandi, hava vit fingið fingið frá Joen Petur Petersen.



*Hetta er ein snøggur rækjubátur, sum Gunnar Nolsøe úr Skopun er skipari á.*



*Gamli "Norðborg" við bryggju í Nuuk. Hann er nú krabbabátur og eitur "Nuummioq".*



*Ja, bjarnir sær man eisini koma tætt upp at rækjubátinum. Her hevur ein leitað sær nokkso nær at finna sær føði.*



*Hetta var eitt gott hál. 35 tons ein góðan summardag í Vesturgrønlandi.*

FFbladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



# Blokhus – sjógvurin hevur verið lagnan

Fyri tey flestu er Blokhus ein frítíðarbýur sum so nógvir aðrir. Her eru fá fastbúgvandi, eini 350. Men ferðamannatalið er hin vegin stórt. Tað kunnu vera upp til 70.000 ferðafólk í senn í hesum økinum. Mest er sjálvsagt á sumri, tá fólk vanliga ferðast. Men um vikuskiftini koma eisini nógv fólk á vetri. Nógvir eru danir, men ein hópur er útlendingar sum skandinavar og týskarar. Nógv teirra búgva í teimum 1.000 summarhúsini á leiðini. Millum gistingarmøguleikarnar er Danland, har ferðafólkini hjá Smyril Line halda til. Her vóru eisini føroyingar í hópatali nú um páskirnar. Onkur hevði talt ikki færri enn 87 føroyskar bilar í senn. Tað var gott at búgva her. Íbúðirnar eru rúmligar við øllum hentleikum sum t.d. uppvaskimaskinu. Serliga væl er Danland egnað til familjur við børnum við møguleikunum fyri at svimja og at spæla uttanfyri.

Tað, sum trekkir serliga á sumri, er sandstrondin, sum er heilar 30 kilometrar long, so her er lagamanni at væta tærnar og meira afturat, tá lýkka er í luftini og sjónum. Sandurin hevur annars ofta verið ein plága um hesar leiðir. Tað eru dømi um at enntá kirkjur eru farnar undir heilt av sandroki. Millum hesar er eisini kirkjan í Hune, sum er beint við Blokhus.

Takkað verður ferðafólkunum eru nógvir hentleikar í býnum. Her er eisini ein ferðamannastova, har tey eru sera fryntlig og har upplýsingar fáast um alt millum himmal og jørð. Frá teimum hava vit fingið fitt av tilfari, sum lýsir søguna hjá Blokhus, og hvussu hetta stað hevur verið heft at havinum.

**Søga aftur til steinøldina**

Hildið verður, at navnið Blokhus stavar frá seinna partinum av 1500 -talinum, tá stórur útflutningur av korni, kjøti og smøri fór fram her og sent til Noregs. Vøran var fyri ein stóran part goymd í stórum køssum ella blokkum, herav navnið. Hildið verður, at tá var bert ein fastbúgvandi í Blokhus.

Hildið verður annars, at handilssamband millum Blokhusøkið og Sørlandet í Noregi skal hava gingið fyri seg síðan steinøldina. Tá jarnbreytirnar vundu uppá seg seinst í 1800-talinum varð vøran flutt aðrar vegir.



*Danland í Blokhus.*





*Hvønn dag kom fiskaseljari úr Hirtshals á sandin við stórum úrvali av fiski og væl gekk at sleppa av við fiskin. Millum úrvalið var smørfiskur, sum kom úr Indonesien, og varð seldur fyri kr. 120 kg. Hinvegin var kalvi so dýrur, at tað slapst ikki av við hann.*

Nógv skip eru gjøgnum tíðirnar forlist á hesum leiðum. Hetta hevur ofta verið kvetti fyri íbúgvararnar. Í desember 1807 forlisti eitt skip við klædnavørum, sum allar róku á land. Tá fingu øll konufólkini nýggj klæði, og í kirkjuni bar væl til at síggja, hvør hevði stjolið hvat av hesum strandingsgóðsi, sum annars skuldi havt verið selt á uppboði!

Men tað var verri enn so. Kend er søgan um bispin Stygge Krumpen, sum átti rættin til alt góðs sum rak á land í Jammerbugtini. Hann hongdi lanternur upp inni í landinum, so sjómenninir skuldu halda, at teir vóru langt til havs, og tað var ikki smávegis fongur, sum fekk úr hesi "forrætning", tá skipini, sum úrslit av hesum, sigldu seg uppá turt.

Seinast í 1800-talinum komu menn eftir, at tað var brúk fyri einum staði, har fólk kundu gista og bygdur varð tann fyrsti keypmannagarðurin. Hetta var byrjanin til Blokhus sum ferðamannastað.

**Sum í Føroyum: Havið gav og havið tók**

Tætt við sjógvin í Blokhus stendur ein minnissteinur um fiskimenn og bjargingarfólk, sum eru farin á sjónum. Steinurin er serliga til minnis um teir, sum fórust við einum bjargingarbáti á jólum 1856, og søgan um hesa hending er hendan:

Jólini hetta árið høvdu verið friðarlig. Tað var ikki so nógv at halda jól fyri, tí lítið hevði verið at fiska eina tíð.

Nakrir av fiskimonnunum høvdu eisini starv við bjargingarstøðina. Teir høvdu strongt á fyri at sleppa at hava eina bjargingarroynd – ikki bert fyri at fáa eina dagløn men eisini fyri at fáa venjingina. Tað vóru nevniliga liðin tvey ár síðan tað veruliga hevði verið brúk fyri bjargingarstøðini.

Leiðarin fyri bjargingarstøðini var Carl Holst. Hann skilti væl hetta ynski hjá fiskimonnum og fekk tað neyðuga loyvi. Tað varð avrátt, at venjingin skuldi fara fram 29. desember. Henda dagin var ein strúkur í vindi av landnyrðingi, og hetta veðrið skuldi verið av fínasta slag til eina slíka venjing.

Alt gekk eisini heilt eftir ætlan í fyrsta umfari, men á veg inn móti landi aftur hendi vanlukkan, og báturin kollsigldi. Holst sá hvat hendi og útvegaði beinanvegin hjálp.

Fimm av monnunum vórðu bjargaðir á land uttan mein. Tveir aðrir vóru illa fyri, meðan fimm róku á land lívleysir.

Roynt varð beinanvegin at fáa lív í hesar menn, men her var einki at gera. Menninir vóru helst longu deyðir, tá teir róku á land. Sent varð boð eftir lækna. Hann kom so skjótt hann kundi, t.v.s. eftir tveimum tímum, men tá var longu øll vón úti.

Tað var hildið sjóforhoyr aftaná. Men niðurstøðan var, at tað bar illa til at lasta nakran. Sjógvurin hevði ikki verið meira ógvisligur enn ofta fyrr. Hinvegin høvdu fleiri gjørt ein stóran innsats fyri at bjarga teimum neyðstøddu, og teir vóru heiðraðir av "Fondet til druknedes redning".

Tað, sum var at finnast at, var, at eingin hevði borið bjargingarbelti. Orsøkin mundi vera at hesi vóru so óarbeiðslig. Men avvarðandi myndugleiki herdi krøvini um, at bjargingarbelti skuldu nýtast.

**Støðan hjá einkjum og børnum**

Eftir sótu einkjur og nógv børn. Tíðin var við at fara frá tíðini, tá hugburðurin var, at hesi máttu klára seg sum best, og tey tí kundu enda á fátækrahúsi. Tískil varð uppskot lagt fyri ríkisdagin at geva møguleika fyri at geva stuðul til eftirsitandi hjá druknaðum bjargingarmonnum. Stuðulin skuldi vera 80 ríkisdálar árliga til einkjurnar og 6-30 dálar til børnini. Onkur tingmaður helt, at hetta var alt ov lítið, men upphæddin varð ikki broytt.

Teir bjargingarmenn, sum bjargaðust, luttóku seinni í nógvum bjargingum, har nógv lív vórðu bjargað.

Umrøddi steinur varð reistur júst 100 ára dagin fyri hesa hending. Stigtakarin til steinin var Blokhus Fiskeriforening. Umframt nøvnini á druknaðu bjargingarmonnunum eru eisini nøvnini á 15 fiskimonnum, sum eru deyðir á sjónum. Hesir eru deyðir í tíðarskeiðnum 1845 til 1956.

Sum skilst, er Blokhus meira enn bert frítíð.





*Hetta er minnissteinurin yvir teir fiskimenn, sum ikki bóru boð í bý. Beint aftanfyri t.h. er ferðamannastovan.*



*Inni á ferðamannastovuni kundi tann fryntliga Inger Thomsen geva upplýsingar um alt millum himmal og jørð. Frá henni er fingið søguliga tilfarið til hesa grein.*

# Føroyavinurin Kirsten Jacobsen

**Tann avgjørt mest kendi borgarin í Blokhus, er fyrrverandi fólkatingslimurin hjá Fremskridstpartiet Kirsten Jacobsen, sum eisini er væl kend í Føroyum.**

Vit komu at kennast í kreppuni fyrst í 90-unum, so tað var rættiliga nærliggjandi at støkka inn á gólvið hjá henni, nú vit í eina viku nærum vóru grannar.

Tað er nú ikki sum Føroyavinur, at hon beinleiðis verður fatað. Tí hvør minnist ikki hvussu hon leikaði í í Fólkatinginum og aðra staðni, tá Føroyar vóru uppá tal.

Men hóast hetta kann sigast, at hon heldur av Føroyum og føroyingum. Hon fór illa við okkara politikkarum, og tað kunnu vera ymsar meiningar um, hvussu rættvíst hetta var, men púra eingin grund hevur so ikki verið fyri tí!

Kirsten hevur ofta verið í Føroyum í almennum ørindum serliga sum limur í politisk/búskaparligu nevndini. Hon gjørdi ikki sum hinir nevndarlimirnir, sum nýttu sína tíð til at fara á fundir við sínar politisku starvsfelagar, har teir limirnir fingu teirra søgu.

Kirsten vildi vita, hvat føroyingar sjálvir hildu um støðuna. Hon kundi seta seg niðri í Vágsbotni, og tá steðgaðu fólk á og fingu eitt prát vit hana. Eitt annað gott mið var Café Natúr, og hon fór enntá á møti í Ebenezer og til drekka aftaná, har kanska onkur hugdi við eftir fremmanda gestinum.

Tá stríðið var millum FF og donsku stjórnina um inntøkutrygdina hjá fiskimonnum, sum var ein partur av avtalunum millum landsstýrið og stjórnina, var Kirsten ein dyggur stuðul, har hon javnan setti Nyrup Rasmussen skák og mát við hansara



*Í Blokhus kom Kirsten Jacobsen inn á gólvið hjá føroyingum. Her síggjast frá vinstru: Kirstin Jacobsen, Kirsten Jacobsen, Henny Olsen, Sára Olsen, Óli Karl Olsen og Heidi Johannesen.*

mótsagnum.

Kirsten er 60 ára gomul. Hon er fødd í Nørre Sundby beint norðanfyri Ålborg og Limfjørðin. Heilt veruliga er hon fødd í Ålborg, men hetta helt hon dult heilt fram til hon giftist, tá hon ikki slapp undan at leggja dópsattestina fram. Fólk í Nørre Sundby leggja nevniliga stóran dent á, at tey hava einki við Ålborg at gera, og tí vilja tey eisini treyðugt viðurkenna, at tey eru fødd í Ålborg, har børn úr Nørre Sundby vegna kríggið máttu vera fødd.

Kirsten varð vald inn á Fólkating í 1973, tá Framburðsfloikkurin fekk sítt fyrsta stóra val. Í 1979 giftist hon við norðmanninum Erik Stormfeldt, og hon gavst í fólkatinginum í 1982 fyri at flyta til Noregs. Men sum frá leið kom hon eftir, at í Noregi kundi hon ikki búgva og henni longdist eftir donskum politikki. So hon flutti aftur til Danmarkar, stillaði upp og varð vald aftur í 1988. Erik fylgdi við og kom at ferðast ímillum.

### Bardist móti órættvísi

Kirsten kom at gerast ein fólkatingslimur, sum kom at markera seg, og sum gjørdist kend av hvørjum mansbarni í Danmark. Og sigast kann, at hon fyrst og fremst kom at berjast móti órætti og rotinskapi, og her gjørdi hon ikki mun á stórum og smáum.

Ein av hennara stóru sakum var bardagin móti realkreditfeløgunum, og var hetta eisini ein partur av søguni um kreppuna í Føroyum. Tað byrjaði við, at BRF hevði sett í seg, at teir skuldu gerast stórir á økinum. Hetta skuldi gerast við at seta umboðsmenn ella sølumenn, sum fingu samsýning í mun til hvussu stór útlán, teir kundu útvega.

Samstundis varð sæð stórt uppá lóggávuna, sum segði, at tað var ikki loyvt at lána meira enn reelt virði var aftanfyri. Schlüter hevði jú sagt, at "det går ufatteligt godt," so her skuldi ikki vandi verið á ferð.

Hetta endaði við fíggjarligum óføri hjá mongum, og fekk hetta Kirsten at fara í kríggj. Fyri at gera eina langa søgu stutta, so endaði hetta við, at høvd rullaðu!

### Umboð fyri tann minni menta

Men tann største týdningin fekk Kirsten sum umboð fyri tann "minni menta mannin", og hon fekk eina støðu sum alternativur umboðsmaður. Kom hon fram á mál, har ein borgari var fyri órætti, so fekk hetta eisini hana at fara í kríggj, og ofta fekk hon eisini rættað skeivleikan. Hon fekk eini 6.000 brøv árliga frá borgarum, sum hildu seg hava verið fyri órætti. Hon sigur í bókini um hana, at víst vóru kverulantar uppi í. Men hon metir, at 8 av 10 høvdu grein í sínum máli. Øll fingu eisini svar. Vegna hesi mál varð hon eisini kallað "Fremskridtspartiets enmandshær."

Nakað undan fólkatingsvalinum í 1998 gjørdist maður hennara sjúkur av krabbameini. Kirtsen legði frá sær sum floksformaður, tók frí frá fólkatinginum, og hon passaði mannin, til hann doyði eftir nøkrum mánaðum.

### Fekk rimmarval sum fáur

Til fólkatingsvalið í 1998 sá illa út hjá flokkinum. Dansk Folkeparti sá út til at fara avstað við øllum atkvøðunum, og alt bendi á, at Fremskridspartiet og harvið Kirtsen skuldu rúka út úr fólkatinginum. Men veljararnir vildu tað øðrvísi. Teir slógu ring um hana, og flokkurin fekk so nógvar atkvøður, at hon varð sjálv onnur umdømisvald í sínum valdømi, sum var óhoyrt fyri ein so lítlan flokk. Hon fekk persónliga 10% av atkvøðunum í Norðurjyllandi. Í sínum egna "kredsi" fekk hon eini 40% av atkvøðunum og í Blokhus fekk hon reinan meiriluta. Hetta framúr valúrslitið bjargaði flokkinum undan at falla fyri sperrimarkinum.

Men skjótt kom slangan í paradísið. Slangan var Glistrup, sum slapp uppí flokkin aftur. Og tað vistu tey í tingbólkinum, at hóast tær dygdir Glistrup kundi hava, so vildi Glistrup skjótt beina fyri flokkinum. So allir fýra fólkatingslimirnir tóku seg úr flokkinum, og eingin av teimum er í fólkatinginum í dag, har flokkurin heldur ikki er umboðaður.

Hóast allir hinir flokkarnir stóðu fjart frá hennara flokki, so varð Kirstin vird av limum í øllum flokkum. Serliga kendur er hennara vinskapur við Lilli Gyldenkilde, sum umboðaði SF, sum einki felags hevði við Framburðsflokkin reint politiskt. Ein annar vinskapur var millum hana og fyrrverandi fólkatingsformannin Erling Olsen. Tað sæst eisini í bókunum hjá teimum báðum, at tey hava virðing fyri hvørjum øðrum.

Í dag hevur Kirsten slept øllum politikki. Aldurin er rættiliga avgerandi her, eins og heilsan ikki er ov góð. Men hon vónar at koma aftur til Føroya, sum hevur eitt stórt pláss í hennara hjarta. Møguliga kemur hon longu í summar saman við einari dóttur.




*Hendan tekningin stóð í Berlingske Tidende eftir at høvd høvdu rullað í realkreditmálinum. Bókstavirnir á afturpørtunum vísa til tey ymisku realkreditfeløgini.*

**SELIR TÚ**
**skipa- ella bátaútgerð?**
So er FF-blaðið einasti holli boðberin, sum ber umboð á skipini – umvegis reiðarlini – hvønn útgávudag.
Gerið eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum.
Tlf: 31 15 69
Fax: 31 87 69
T-post: ff-blad@post.olivant.fo

# Søgan um Fisker Kaj og Kirsten

**Frítíðarfiskimaðurin Kaj Nielsen stóð til at missa eina millión fyri at hava avreitt fyri kr. 4.000 í einum ári. Men so kom Kirsten Jacobsen uppí leikin!**

Ein av døgunum í Blokhus varð avrátt, at vit, konan og børnini, saman við Kirsten Jacobsen skuldu fara út at fáa ein bita. Vit fóru norður við strondini við henni sum ferðaleiðara. At práta liggur væl fyri hjá Kirsten sum altíð, og umframt at greiða frá økinum, har vit koyrdu, greiddi hon so eisini frá fleiri av teimum sakum, sum hon hevði verið í holt við.

Felags fyri hesar sakir var, hvussu borgarin kundi koma fyri av eini "skriviborðsløggávu", sum ikki tekur hædd fyri tí veruliga lívinum. Men hesi mál vístu eisini, at verður nóg dyggiliga gjørt vart við hvussu órímiligt hetta kann vera, so verða málini tikin upp og rættað.

Eitt av hesum málum var um Kaj Nielsen ella Fisker Kaj, sum gjørdist heitið, hann varð kendur undir um alt Danmark og kanska í Føroyum eisini.

Kaj er í dag 65 ára gamal. Fyri nógvum árum síðani gjørdist hann deyvur av eini vanlukku. Tað, at hann gjørdist deyvur seint, merkti, at hann kundi tosa, men hann hoyrdi einki. Hann giftist við Ullu og fekk børn, og hann hevði eitt lív sum ein miðal hampa maður.

Tá hann eftir eitt langt arbeiðslív verður 60 ár, velur hann at fara á eftirløn, sum er ein serlig donsk skipan. Hon merkir, at viðkomandi fær eina ávísa upphædd, sum svarar til fólkapensjón at liva fyri inntil vanliga pensjónsaldurin, tá tann skipanin tekur við. Tað eru ymsiar treytir fyri at vera á eftirløn. M.a. er tað avmarkað, hvussu nógv viðkomandi kann forvinna umframt. Ein av treytunum er, at tað er ikki loyvt at hava vinnuligt virksemi.



*Her sæst Óli Jacobsen saman við Kirsten Jacobsen og Kaj Nielsen. Teirra søga er bæði skelkandi og hjartanemandi.*



*Kaj býr á Lønstrup-leiðini, sum er ein lítil fiskivinnubýur. Sum sæst, verða bátarnir drignir uppá sandin.*

### Viðfarin sum ein brotsmaður

Kaj hevur ein bát, sum hann nýtir at fara á flot til húsbrúks. Var veiðan meira enn hetta, fingu familjan og onnur burturav til eitt kók. Men onkuntíð var so mikið í gørnunum hjá honum, at hann sendi avlopið til uppboðssøluna í Hirtshals. Tað kann so ikki hava verið tað heilt stóra, tí hetta eina árið hevði hann avreitt fyri umleið kr. 4.000.

Hevði hann so bert látist sum einki, so var hann sloppin undan nógvum trupulleikum. Men sum tann hampa maður hann er, so gevur hann hesa upphæddina upp, tá sjálvuppgávan skal gerast fyrst í fylgjandi ári. Og tá hevði hann ikki eingang trekt frá tær útreiðslur, sum hann hevði havt av hesi inntøku, sum t.d. keyp av nýggjum páhangsmotori.

Nú vaknar "systemið". Kaj hevur ímóti reglunum havt vinnuligt virksemi! Og tá merkir tað einki, um talan er um 1.000 kr. ella ein millión. Og hetta merkir, at hann hevur brotið fortreytirnar fyri at fáa eftirløn. Og frá nú av verður hann viðfarin sum ein regulerur brotsmaður av tí stóra slagnum. Vegna hesar kr. 4.000 verður hann kravdur at afturgjalda ta upphædd, sum hann hevði fingið í eftirløn. Afturat hesum skuldi hann gjalda eina bót uppá kr. 150.000. Umframt hetta varð hann frákendur rættin til eftirløn med alla. Tilsamans skuldi hann bøta eina millión krónur fyri hesar kr. 4.000, sum hann erliga hevði givið upp, men sum eingin hevði varnast, um hann lætst sum einki. Hetta var jú ein fíggjarlig vanlukka fyri mannin, sum misti alt sítt lívsgrundarlag og Kirtsen váttaði, at hann kláraði seg bert við hjálp frá gudi og góðum fólki. Hann fór til fakfelagið hjá sær, sum skuldi verið tað nærmasta at hjálpt honum. Men her var eingin hjálp at finna. Her var svarið, og maðurin kundi bert havt lisið uppá reglurnar, tá hann fór í holt við eftirlønina. Fyri tað, at hann var deyvur dugdi hann væl saktans at lesa! Hetta var pamparí av tí ringasta slag.

### Men so kom Kirsten uppí leikin

Men so kom Kirsten Jacobsen uppí leikin, og hetta varð júst eitt mál fyri hana. Fyrst varð málið reist politiskt í fólkatinginum. Her vóru øll samd um, at hendan løggávan var so margháttlig, at hon mátti broytast, og hetta hendir eisini í Fólkatinginum.

Men hendan løggávan var ikki gjørd við afturvirkandi kraft, so hon hjálpti ikki Kaj, sum framvegis hevði somu trupulleikarnar. Men hóast Kaj bert var ein einstaklingur, so slepti Kirtsten ikki honum uppá fjall, tí framvegis var hann offur fyri einum himmalrópandi órættvísi.

Fyri at gera eina langa søga stutta, so fekk Kirsten stuðlað Kaj til at fara rættarvegin við málinum, og tað endaði í landsrættinum. Her fekk Kaj ein advokat úr Hjørring, sum Kirsten fekk útvegað honum. Hjá einum slíkum manni at fara í rættin var ikki lætt. Hann hoyrdi jú einki. Útvegað varð honum ein almennan deyvatolk, men hetta riggaði einki serliga væl. So var skipað fyri, at dóttirin gjørdist tulkur. Tey bæði vóru jú von við at tosa saman. Tá kundi almenni tulkurin virka sum eftirlit av at rætt varð endurgivið.

Endin varð, at Kaj fekk viðhald í landsrættinum og varð fríkendur.

### Vinir fyri lívið

Henda sakin hevur, sum rímiligt, er skapað eitt serligt vinalag millum Kirsten og Kaj við familju. Tey rokna hana sum ein part av familjuni, og sum tey søgdu, tá tey feiraðu sigurin í landsrættinum: Tað høvdu tey eisini gjørt um tey taptu. Tí her høvdu tey møtt einum politikkara sum hevði umsorgan fyri teimum sum einstaklingum. So tey síggjast javnan framvegis.

### Enn eitt undur

Hendan sólskinssøgan endar ikki her. Ein dagin ringir telefonin heima hjá Kirsten í Blokhus, og ein rødd sigur: "Kirsten, det er Kaj". Kirsten visti, at tað ikki nyttaði at svara honum aftur, so hon spyr: "Er Ulla der". Hon roknaði við, at konan mundi vera í einum øðrum horni, og so kundi hon taka yvir.

"Jamen Kirsten, du kan godt tale til mig, for jeg kan godt høre, hvad du siger!"

Nú er hent tað, at tøknin á hesum øki nú er so framkomin, at Kaj hevur fingið innopererað eitt tól, sum gjørdi, at hann nú kundi hoyra sum vanlig fólk eftir at hava verið deyvur í fleiri ártíggir!

Tað er óneyðugt at siga, at hetta var ein minnilig telefonsamrøða. Tað man vera sjáldan, at ein sak hjá einum politikkara hevur fingið ein slíkan lukkuligan enda í víðastu merking sum henda.

### Vit hitta Kaj

Sum vit koyra sigur Kirsten, at kanska kunnu vit hitta Kaj. Hann hevði nevniliga búð á teimum leiðum, sum vit koyrdu. Men eftir at ein pyromanur hevði sett eld á húsini, tordi konan ikki at búgva har longur. Húsini vóru seld og tey flutta nakað hagani. Men nýggi eigarin hevði lovað Kaj, at hann framvegis kundi dyrka grønmeti á jørðini, sum hoyrir til gomlu húsini hjá honum.

Vit koyra tann vegin, og mín sann um Kaj ikki er á stykkinum í fullari ferð við at seta niður. Vit nærkast so spakuliga og Kirsten rópar á Kaj, og so knappliga hoyrir hann og vendir sær á. Og tað var eitt klemm!

Kaj var fittur og fryntligur at práta við. Bert var hann harmur um, at hann ikki visti um vitjanina frammanundan, so hann kundi latið seg ordiliga í! Men tað skuldi hann ikki leggja nakað í. Hann fortaldi annars, at ein beiggi hansara Knud Nielsen, hevur arbeitt sum løgreglumaður í Føroyum, og sum tað skilst hevur hann búð í Havn.

Sigast kann, at tað at hitta Kaj eftir at hava hoyrt søguna um hann beint frammanundan, og so tað, at síggja tey bæði saman, var eitt upplivilsi, sum ein seint fer at gloyma.

Ein kann vera samdur ella ósamdur við politikkin hjá danska framburðsflokkinum. Men við tí leikluti, sum Kirsten hevur havt, hevur tað veruliga ongan týdning hvønn flokk hon hoyrir til. Tað, sum hevur týdning, er, at tá hon kemur fram á slíkan órætt, kann hon øsa seg nakað so ókristiliga, og tá sparir hon hvørki høgan ella lágan. Og hetta gevur úrslit. Hetta er ein eginleiki, sum telur meira hjá einum politikkara enn alt annað.

Tað skal sigast, at í Danmark hava teir eina pressu uttan politiskan sjálvsensur. So tá hon hóttir við at beina pressuna eftir almennum pávum, tá er slottið ofta hálvt vunnið.

Men nú skal hendan sólskinssøgan ikki skemmast við at fara at sammeta við føroysk viðurskifti!

Men søgan um Kaj er lívsjáttandi bæði so og so.

*ó.*

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. april 1996 | afregning nr. 44656 | kg.: | 37,00 | udbetalt | kr.: | 191,62 |
| 29. april 1996 | afregning nr. 44559 | kg.: | 47,00 | udbetalt | kr.: | 311,86 |
| 6. maj 1996 | afregning nr. 44868 | kg.: | 41,00 | udbetalt | kr.: | 252,26 |
| 6. juni 1996 | afregning nr. 45852 | kg.: | 37,50 | udbetalt | kr.: | 199,74 |
| 1. juli 1996 | afregning nr. 46745 | kg.: | 56,00 | udbetalt | kr.: | 428,04 |
| 22. juli 1996 | afregning nr. 47130 | kg.: | 34,00 | udbetalt | kr.: | 168,36 |
| 16. sept. 1996 | afregning nr. 49012 | kg.: | 66,00 | udbetalt | kr.: | 485,90 |
| 20. sept. 1996 | afregning nr. 49264 | kg.: | 35,00 | udbetalt | kr.: | 272,96 |
| 23. sept. 1996 | afregning nr. 49307 | kg.: | 143,00 | udbetalt | kr.: | 1.211,26 |
| 24. sept. 1996 | afregning nr. 49407 | kg.: | 61,00 | udbetalt | kr.: | 525,22 |

Der foreligger således i perioden 29. april 1996 til den 24. september 1996 i alt 10 afregninger for i alt 557,50 kg. torsk. Heraf var 2 af afregningerne fra den samme dag. Kaj Nielsen fik udbetalt i alt 4.047, 24 kr.

*Kaj Nielsen avreiddi 1.000 pund av fiski fyri kr. 4.000 í eitt ár. Fyri hetta skuldi hann missa eina millión!*



Maarup Kirke við parti av kirkjugarðinum

# Kirkjan sum var dømd at fara í havið

**Á útferðini saman við Kirsten Jacobsen vitjaðu vit eisini Maarup Kirke, sum má sigast at hava eina heilt serliga søgu.**

Kirkjan er bygd í 13. øld í Maarup, sum er ein strandabygd beint við Lønstrup norðanfyri Løkken. Eins og aðrastaðni í Vesturjyllandi hava tey her merkt, hvussu stóra megi havið hevur. Sum dømi kann nevnast, at í 1808 forlisti ein ensk fregat "The Crescent" her á leiðini og 226 mans druknaðu. Av hesum vórðu 30-40 jarðaðir í eini felagsgrøv í Maarup krikjugarði.



*Hetta er akkerið frá "The Crescent", sum varð bjargað í 1940.*

Hóttanin móti kirkjuni gjørdist, at havið hvørt ár etur seg 2 metrar inn í bakkan. Yvir eitt longri tíðarskeið kann hetta jú gerast eitt rættilig strekki, og sum frá leið kom hendan gongdin eisini at hótta kirkjuna. Menn kundu rokna seg fram til, hvussu nógv ár fóru at ganga, áðrenn kirkjan fór í havið. Tí var fyrst í hini øldini avgjørt at byggja eina nýggja kirkju longri inni í landinum, og hendan nýggja kirkjan í Lønstrup varð vígd í 1928.

Inntil 1978 vóru gudstænastur hildnar í Maarup kirkju á sumri, samstundis sum bakkin nærkaðist. Og í 1998 var innbúgvið tikið úr kirkjuni, og nú var bakkin bert 25 metrar burturi.

Síðani 1998 hevur 2. páskadag verið hildin ein serlig minningargudstænasta við kirkjuna.

Men tað vóru tó fleiri og fleiri, sum ikki vildu bert lata standa til, og sum valdu at gera nakað fyri at varðveita kirkjuna. Tað var jú sárt at vita sær, at eisini kirkjugarðurin skuldi fara í havið og harvið leivdirnar av forfedrunum. Kirkjan var eisini so mikið áhugaverd, at hon átti at varðveitast. Millum hesi, sum høvdu hesa hugsan, vóru eisini fólkatingslimirnir í Norðurjyllandi, og Kirtsen Jacobsen var ein teirra.

Tann brennandi spurningurn var, um tað kundi bera til at steðga gongdini við at havið etur seg inn í bakkan. Allir "serfrøðingar" hildu, at hetta kundi als ikki lata seg gera. Men tað vóru onnur, sum høvdu eina aðra hugsan. Ein av hesum var verkfrøðingurin Poul Jakobsen. Hann uppfann nøkur "drenrør", sum hann sjálvkravdur setti inn í bakkan, og sum skuldu forða fyri umrøddu gongd. So skipað sum danska samfelagið er, so var hetta púra ólógligt, og "systemið" kravdi rørini burturtikin. Men nú vóru fólk so heit uppá, at varðveita kirkjuna, at umhvørvismálaráðið gav loyvi til eina 3 ára royndartíð til hesa uppfinning.

Nú eru hesi trý árini farin, og bakkin skuldi havt otað seg 6 metrar afturat inn móti kirkjuni, men tað kann í dag staðfestast, at her er eingin broyting hend, og Poul Jakobsen heldur, at kirkjan er tryggjað í minsta lagi 50 ár afturat.

Um myndugleikarnir fara at boyggja seg fyri hesum er enn óvist, men kanska fara vit at frætta meira um hetta.



*Henda myndin vísir, hvussu nær bakkin er kirkju og kirkjugarði. Frástøðan til bakkan er 25 metrar, og við 2 metrum um árið er lætt at rokna út, hvussu langa tíð kirkjan hevur eftir.*

# Framleiðarar av fiskamjøli verja seg í ES parlamentinum

23. apríl var ein hoyring í ES parlamentinum um ídnaðarveiðu. Meðan politikarar og áhugabólkar í ES síggja vandar í ídnaðarveiðu av fiski, royndu umboð fyri stóru framleiðaralondini og vinnuna at lýsa, hvat er veruleiki í hesum máli.

Í ES síggja ávísir politikarar og umhvørvisbólkar vandar í ídnaðarveiðu. Teir halda at ídnaðarfiskiskapur til framleiðslu av djórafóðri og fóður til alifisk hóttir fiskastovnarnar. Eisini halda teir at fiskurin heldur átti at verið nýttur til mannaføði.

Fiskivinnan og framleiðarar av fiskamjøli og fiskaolju svara nú aftur uppá ábreiðslurnar, og stóru framleiðaralondini Chile og Peru sendu fiskimálaráðharrar sínar til hoyringina í ES parlamentinum. Endamálið hjá vinnuni er eisini at fáa ES at avtaka fyribils bannið fyri nýtslu at fiskamjøli í fóðri til jóturdýr.

"Flestu fiskasløg, sum verða veidd sum ídnaðarveiða, eru lítið eftirspurd sum mannaføði. Talan er ofta um smáan, beinutan fisk" sigur Dr. Stuart Barlow, stjóri í altjóða felagnum hjá framleiðarunum av fiskamjøli og fiskaolju. "At framleiða hendan fisk til fóður er tríggjar ferðir effektivari nýtsla av rávøruni, enn at royna at gera mat burturúr honum."

ES londini framleiða eisini fiskamjøl og fiskaolju, men meginparturin av hesari framleiðslu er burtur úr slógvi frá fiskaframleiðslu til matna. Í Spanien er øll framleiðslan burturúr slógvi, í Bretlandi 85%, og Írlandi 60%. Danmark framleiðir hinvegin fiskamjøl og fiskaolju burtur úr ídnaðarfiski og er tí undantak í ES høpi.

Í framløgu síni vísti Barlow á, at sjálvt um alheims alivinnan er vaksin sera nógv, er framleiðslan av mjøli og lýsi ikki vaksin, men hevur staðið í stað. Framrokningar vísa, at í 2010 fer alivinnan at brúka minni enn helmingin av heimsframleiðsluni av fiskamjøli, og umleið 80% av lýsinum. Eftir 2010 fer alivinnan væntandi at nýta minni av bæði mjøli og lýsi, tí onnur evni fara í størri mun at verða partur av fóðrinum, m.a. plantuolja.

Helge Korsager, sum er formaður bæði í evropeiska og altjóða felagnum hjá framleiðarunum av fiskamjøli segði á fundinum: "Vinnan ynskir ikki niðurfisking av stovnum, ei heldur ov stóra hjáveiðu. Vinnan ynskir eina burðardygga og støðuga tilgongd av ráværu." "Vísir tað seg hinvegin, at tað er nóg stórur áhugi at brúka okkurt av fiskasløgunum, sum nú verður veitt sum ídnaðarveiða, til matna, so skiftir vinnan kós. Men hetta krevur, at prísurin á hesum fiskasløgum fer upp um tað, sum vit í dag fáa burtur úr mjøl og lýsi," segði Korsager.

Í ES hevur eisini verið umrøtt, um tað er etiskt rætt, at geva fenaði fiskamjøl. Á fundinum framlegði The Fishmeal Information Network eina nýggja frágreiðing um hendan spurningin. Frágreiðingin staðfestir, at í náttúruni eta flestu djór proteinir av øðrum djórum. Men hetta hevur brúkarin ilt við at skilja.

Vinnan vónar eftir fundin, at ES fer at avtaka fyribils bannið fyri nýtslu at fiskamjøli í fóðri til jóturdýr, og at tað hevur eydnast at fáa politikarar og áhugafelagsskapir at skilja, at fiskamjøl og fiskaolja er eitt gagnligt og náttúrligt lið í framleiðsluni av mannaføði.

*Vinnuhúsið*

# Stór vitjan úr Hanstholm

## Í sambandi við fiskivinnuframsýningina var stór vitjan úr Hanstholm í Føroyum.

Tey vóru ikki færri enn uml. 35, sum komu upp við "Norrönu", og sum eisini fór avstað aftur við henni.

Tað er ikki so løgið, at leiðslan í Hanstholm følir seg knýtt at Føroyum, tí teir síggja jú Føroyar og føroyingar hvørja viku, tá "Norröna" kemur og ferð, og hetta skapar jú fitt av virksemi í býnum, og knýtir Hanstholm saman við Føroyar og eisini tær havnir, har "Norröna" annars siglir. Mikukvøldið undir framsýnignini varð eisini boðið til døgurða umborð á "Norrönu", har borgmeistarin í Hanstholm var vertur. Her var høvi til at tosa við fleiri av gestunum.

Føroyar og Hanstholm hava eisini annað til felags. Í báðum førum er talan um smá samfeløg. Hanstholm Kommuna er stór til víddar, men her búgva fá fólk. Samlaða fólkatalið í kommununi er um 6.000, og í Hanstholm býi búgva umleið 3.000, so helst er hon minsta kommuna í Danmark.

Men so hava vit eisini tað til felags, at vera heft at fiski og tí sum fæst burtur úr her. Her leggja hvørt ár fiskifør til kai 35.000 ferðir úr 13 londum. Tað verða landað 40-50.000 t. av matfiski og meira enn 100.000 t. av ídnaðarfiski, og er virðið av heusm 6-700 milliónir árliga.

Tað sigst, at tað er sera lagaligt at seta virki á stovn í Hanstholm og annars í Viborg amti, har Hanstholm hoyrir heima. Tað, sum stuðlar positivu gongdini, er ein positiv fakfelagsrørsla, sum vil gera sítt til at fáa gongd á.

Uppboðssølan í Hanstholm er tann største í Danmark. Higar kemur eisini fitt av fiski bæði úr Noregi og Føroyum, sum eisini verður flutt við fraktskipi.

Afturat hesum er ein hópur av fyritøkum, sum hava samband við fiskivinnuna sum t.d. skipasmiðja, ísvirki og nógv annað. Tað er tískil ikki so helt lítið, sum vit hava í felag.

Tað eru tó ikki nógvir føroyingar í Hanstholm. Tey, vit hava tosað við, meta at talið liggur um 30, og teir flestu av teimum eru suðuroyingar.




*Hanstholm er ein tann nýggjasta havnin í Danmark. Hon stavar frá 1967. Kaikanturin er ikki minni enn 4,5 km. Tað kann tí taka ein heilan tíma við einum kaitúri til gongu.*



*Her síggja vit frá vinstru borgmeistaran Einer Frøkjær, Henning Bjerregaard Pedersen og Erik Matthiassen.*

*Henning er nevndarformaður í Hanstholm Fiskemelsfabrik. Hendan sigur seg taka ímóti fiski allar 24 tímarnar í samdøgrinum. Tikið verður ímóti góðum 100.000 t. av ídnaðarfiski árliga. Framleiðslan er sera framkomin, og líðugtvøra av bestu góðsku verður útflutt til stórt sæð allan heimin. Tí kann verksmiðjan til eina og hvørja tíð geva sera kappingarførar prísir fyri rávøruna.*

*Henning og konan høvdu ikki verið í Føroyum fyrr, og tey vóru sera fegin um hendan møguleikan, og tey vóru eisini hugtikin av okkara landi. Hann er professionellur nevndarlimur, og er hetta bert ein av hansara nógvu sessum. Hann sigur, at nevndin er mannað við fólki, sum hevur skil á fiskiskapi og framleiðslu. Sjálvur hevur hann skil á tølum. Alt hetta tryggjar, at leiðslan veruliga er professionell.*

*Erik er leiðari av Hanstholm Havneforum, sum er ein felagsskapur við 80 limum, sum gera tænastu av ymiskum slagi í havnini í Hanstholm. Bert hetta limatalið sigur nakað um eitt yvirhonds stórt virksemi. Ein av uppgávunum er tískil at luttaka í framsýningum sum hesari.*



*Á páskatúrinum hjá Norrønu hittu vit nakrar av føroyingunum í Hanstholm. Í miðjuni eru tað Andor og Anna Bjarkhamar. Tey eru úr Vági, men fluttu undir kreppuni fyrst í 90-unum til Hanstholm. Andor hevur altíð verið fiskimaður, og hetta royndi hann eisini í Hanstholm. Men nú er hann lagstur uppá land. Teimum báðum dáma sera væl í Hanstholm og hava ikki ætlanir um at flyta heim aftur. Tó eru tey hvørt ár heima og ferðast. Og hvønn leygardag hava tey møguleika at hitta bæði komandi og farandi føroyingar. Afturat hesum koma javnan føroysk fiskiskip til Hanstholm at landa, og her man Andor vera fastur gestur á kajuni. Annars var abbi Andor ein av teimum, sum í 1910 tók stig til at stovna Føroya Fiskimannafelag. Hetta var Doreus Jacobsen úr Norðragøtu. Sum ungur flutti hann til Vágs. Hann koyrdi lastbil hjá garðamonnum í 50 ár og sjálvur gjørdist hann 100 ár.*

*Til høgru á myndini er Dávur "hjá Seyðamanninum", sum er ættaður av Tvøroyri. Hann hevur búð í Esbjerg, men er nú í ferð við at flyta heim aftur. T.v. er tað Hjalgrim Ludvig. Hann er ættaður úr Fámjin, men hevur búð á Tvøroyri. Nú er hann búsitandi beint uttanfyri Hanstholm.*



*Hetta er fiskamjølsvirkið, har Henning Bjerregaard Pedersen er nevndarformaður.*



*Úr fiskaríhavnini í Hanstholm*

Tíðindaskriv frá Føroya Fornminnissavni:

# Myllan í Kúrdali reist

Týsdagin 8. apríl 2003 varð ein lítil hátíðarløta í Kúrdali í Hoyvík í sambandi við, at nýggja myllan hjá Føroya Fornminnissavni varð reist.

Tað er Arngrím Árting frá AM-smíð, ið hevur gjørt timburarbeiðið.

Tað var sama virkið, sum í fjør stóð fyri at gera yvirtrom og flagtekjuna á neystið niðri á støðni í Hoyvík.

Myllan er reist eftir tekningum av Mayfinn Norðoy, arkitekti á Føroya Fornminnissavni. Hon er gjørd eftir somu flatmynd sum myllan í Kunoy. Annars eru tekningarnar gjørdar eftir 100 ára gomlum fotomyndum og uppruna-støði.

Myllusteinar og kvarnkallur til mylluna eru eisini varðveitt.

Myllan stendur niðarlaga í Kúrdali og til ber hjá fólki at koma og síggja hana og tað gamla handverkið, sum brúkt verður í hesum smíðnum.

Ætlanin er seinni at klæða mylluna og gera innviðin, soleiðis at hon kann standa liðug komand i summar.



*Myllan stendur niðarlaga í Kúrdali.*

PostScript billede
(dekkari\(ff\).eps)

# Stevna fyri ættina í Túni á Toftum

Sum kunnugt er ættin eftir Hanus (yngra) og Jóhonnu í Túni á Toftum fjølment í Føroyum og eru enntá ættarfólk av hesi ætt í Íslandi, eftir dóttir teirra, Susanne og í Noreg eftir syni teirra Joen, kallaður Tofta Jógvan.

Ættargreinirnar í Íslandi og Noreg sýna stóran áhuga at koma higar í summar fyri at heilsa uppá skyldfólkini í Føroyum.

Ættarfaðir okkara, Hanus og sonur hansara Tummas sjólótust tann 30. apríl 1870 tá bátur teirra "Duen" gekk burtur við 5 monnum – eystanfyri Eystnes.

**Børn Hanusar og Jóhonnu vóru:**

| | |
|---|---|
| 1. Hanus Hansen | ógiftur, Toftir. |
| 2. Tummas Hansen – 1870 | giftur v/Juliu, Toftir. Tey fingu 1 dóttir – Thomina, sum giftist til Havnar. |
| 3. Susanne Hansen | gift v/Joen Petur Tórshavn (fyrra gifta) Tey fingu 1 dóttir – Hansina giftist á Vopnafjørðinum í Íslandi |
| 3. Súsanna Hansen | gift v/Niclas Jacob, Skipanes, (seinna gifta). Tey fingu 1 dóttir – Katrina Maria, ógift |
| 4. Joen Hansen | giftur v/ Anne Greta (Húsar) Tórshavn Tey fingu 1 dóttir – Johanne giftist til Stavanger, Noreg. |
| 5. Anna Maria | gift v/ Joen Jacob Joensen, Húsar. Tey fingu 6 børn – Clement, Johanne, Rakel, Hanus, Katrina og Thomina. |
| 6. Justines Hansen | gift v/ Katrinu, Toftir. Tey fingu 8 børn – Billa, Hanus, Elisabeth, Andrias, Jóhannus, Anton, Tummas Juul og Karl. |
| 7. Johanne | gift v/Jóanis Lind, Svínoy. Tey fingu 6 børn – Elspa Sofie, Jóhanne Sofie, Pól, Hans, Sigga, og Tummas. |
| 8. Hanus Hansen | giftur v/Elisabeth, Æðuvík. Tey fingu 3 børn – Magnina, Óla hans og Johanne Sofie. |
| 9. Jóhan Hansen – 1867-1960 | giftur v/Mette Manelle, Nes. Tey fingu 7 børn – Hans Jacob, Peter Hans, Tummas Johan, Anna Kristine, Olaf, Margretha og Henrikka. |

Ættarstevnan verður í Ítróttarhøllini á Skála Fríggjadagin 25. juli 2003.

Eftirkomarar, íð ynskja at luttaka, verða at tekna seg hjá einum av niðanfyri nevndu, í seinasta lagi fríggjadagin 4. juli 2003.

Veitslan er avmarkað til børn og barnabørn hjá nevndu syskinabørnum við maka. Talan er soleiðis um eina trímenninga og fermenningaveitslu.

**Vegna fyrireikararnar:**

| | | |
|---|---|---|
| Eftirkomari eftir Tominu: | Jóhannus Rubbeksen Tórshavn, | tel. 312341 |
| " " Onnu Mariu: | Elinborg Solmunde, Syðrugøta | tel. 441438 |
| " " Justines: | Josefina Jacobsen, Saltnes | tel. 447438 |
| " " Johanne: | Flóvin Jacobsen, Velbastað | tel. 328001 |
| " " Hanus: | Jovina Højgaard, Tórshavn | tel. 312755 |
| " " Johann: | Emil Hansen, Nes | tel. 447178 |

# Svartskygni á fiskivinnustevnu í Brüssel

Føroyskir fiskaseljarar, sum eru á stórari altjóða fiskivinnustevnu í Brüssel, lata illa at tí, sum higartil er komið fram á stevnuni. Hugurin at keypa er lítil, og fiskaprísirnir falla stútt.

Rækjuprísurin er í botni, laksaprísurin er minni enn framleiðslukostnaðurin, áhugin fyri upsanum minkar alsamt, og marknaðurin fyri hýsu er lítil. Tó vilja spaniumenn framvegis keypa nakað av saltaðum toski.

Høvuðsorsøkin til skeivu gongdina er afturgongd í heimsbúskapinum, sum hevur við sær viknandi búskapir í ymsu londunum og hóttafall summastaðni. Kinesarar eiga eisini sín stóra lut í vánaligu gongdini. Teir yvirfloyma evropeiska marknaðin við fiski, sum er so bíligur, at eitt nú føroyingar ikki standa seg í kappingini. Eisini hevur lungnasjúkan SARS ávirkað gongdina skeiva vegin.

Einki røkist fyri, at gongdin vendir í bræði, og tí mugu tøk takast, um føroyigar skulu verja sína støðu í kappingini millum fiskaútflytararnar. Trýstið á prísin er stórt, og megna føroyingar ikki at framleiða vørurnar fyri kappingarføran prís, er vandi fyri, at fiskaframleiðslan í Føroyum minkar munandi.

Í fjør fóru 50.000 tons av fiski óvirkað av landinum. Tað svarar til 800 ársverk ella fýra ferðir árligu framleiðsluna á Kósini. Missa føroyingar fleiri tons óviðgjørd av landinum, og vánaliga gongdin á marknaðinum heldur fram, er lítil ivi um, at talið á arbeiðsplássum innan fiskaframleiðslu í Føroyum minkar.

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA






### Fiskimannafelagið í Hirtshals:

# Vilja heldur hava fiskidagar enn kvotu

Danskir fiskimenn verða eitt sindur øðrvísi skipaðir enn føroyskir. Høvuðsfelagið hjá teimum er Danmarks Fiskeriforening, sum er skipað á sama hátt sum Meginfelag Útróðrarmanna. DF er eitt meginfelag av lokalum fiskaríforeiningum, har sovæl fiskimenn, sum teir sum eiga bátarnar, eru limir.

Tað var tað stóra danska arbeiðsmannafelagið SiD, sum byrjaði sum fakfelag at skipa fiskimenn. Fyri umleið 30 árum síðani fóru teir, undir leiðslu av Anker Jørgensen sum formanni, í verkfall móti Danmarks Fiskeriforening fyri at fáa ein sáttmála og hetta eydnaðist eisini, hóast teirra sáttmáli er meira leysur enn tann hjá føroyskum fiskimonnum. Viðvíkjandi prosentbýti verður bert sagt, at tað skal ikki versna. Teir hava annars eina minstulønarskipan og eftirlønartrygging í teirra sáttmála.

Tað vóru tó ikki allir fiskimenn, sum vildu vera limir í einum so stórum felagsskapi sum SiD, har fiskimenn bert vóru ein dropi í havinum. Afturat hesum mundi koma, at SiD jú hevði tilknýti til danska javnaðarflokkin, sum nógvir fiskimenn annars ikki hava. So nakrir teirra stovnaðu Fiskernes Forbund, sum nærum bert umboðar fiskimenn. Her eru teir bert 1.000, so her kenna allir hvønn annan, og teir kunnu geva eina meira persónliga tænastu. Felagið hevur annars deildir í 14 fiskivinnuplássum við høvuðsskrivstovu í Skagen.

Felagið hevur eitt limablað, sum kemur út fýra ferðir árliga, har tað verður greitt frá felagstíðindum.



*Mogens Knudsen, sum er kassameistari í Hirtshalsdeildini av Fiskernes Forbund.*

Hesir bæði fakfeløgini kappast so um at fáa fiskimenn sum limir, og støðan er tann, at SiD hevur umleið 800 fiskimenn, meðan Fiskernes Forbund hevur umleið 1.000.

Hendan dagin FF-blaðið var í Hirtshals, komu vit fram við skrivstovuni hjá Fiskernes Forbund og fóru inn á gólvið. Tað var stongt hendan dagin, men vit hittu kassameistaran í Hirtshalsdeildini Mogens Knudsen, sum hampaði uttanfyri. Hann kom inn, og vit fingu eitt prát um felagið og støðuna hjá fiskimonnum í Danmark og Hirtshals. Teir hava annars fleiri føroyingar sum limir. Hetta eru slíkir, sum fiska við nótaskipunum, sum hoyra heima her, og sum fyri ein stóran part eru mannað av føroyingum, bæði slíkum sum búgva fast í Hirtshals, og slíkum sum búgva í Føroyum.

**Arbeiðsloysiskassin**

Tað, sum telur mest hjá donskum fiskimanni fyri at gerast limur í einum fakfelagi er arbeiðsloysiskassin. Tað er eisini her, kappingin er avgerandi millum Fiskernes Forbund og SiD. Her siga teir í Fiskernes Forbund, at allar kanningar vísa, at teirra kassi er tann best umtókti fyri at geva ta bestu tænastuna. Í stuttum virkar hann soleiðis, at er fiskimaður heima millum túrar, so verður hann roknaður sum "ledig" og fær dagpening. Hevur inntøkan verið minni enn kr. 70.000 seinasta ársfjórðingin, so verður veitt frá fyrsta degi. Er inntøkan omanfyri kr. 70.000, so eru reglur um bíðitíð. Men tað verður altíð sloppið inn í A-kassan eftir 5 vikum. Tann veitti arbeiðsloysisstuðulin svarar til í mesta lagi kr. 160.000 árliga.

Felagið hevur eisini eina samlagstrygging, sum við deyða gevur kr. 50.000 í hondina + kr. 10.000 pr. barn.

Annars kann sigast, at Fiskernes Forbund hevur stórt sæð sama virkisøki sum FF, nevniliga at fáa bøtt um tær skipanir, sum eru galdandi fyri teirra limir.

**Nú er arbeiðsloysi hjá donskum fiskimonnum**

Annars letur Mogens Knudsen illa at gongdini í donsku fiskiveiðini. Gjøgnum nógv ár hevur gongdin verið tann, at kvoturnar eru minkaðar. Hetta hevur merkt, at fleiri og fleiri skip eru høgd upp. Nærum einasti stuðul, sum verður latin til fiskivinnuna, er nevniliga upphøggingarstuðul. Men uttan mun til hvussu nógv verður høgt upp, minkar hetta ikki um yvirkapacitetin samb. "teimum klóku". Hetta er ein ónd ringrás, sum kvalir danska fiskiveiði so líðandi.

Í fleiri ár hevur neyðin verið tann hjá donsku fiskivinnuni, at tað hevur verið ringt at fáa fólk. Men nú eru so fá skip eftir, at tað verður tosað um arbeiðsloysi hjá donskum fiskimonnum. Í Hirtshals verður tað mett til at vera 15%, sum er munandi meira enn arbeiðsloysið, sum annars er galdandi í Danmark.

Samstundis eru umstøðurnar hjá fiskimonnum gjørdar so truplar, at tað er nærum ómøgulgit at liva við teimum.

**Trupult at vera fiskimaður í Danmark**

Eitt er kvotaskipanin. Mogens Knudsen er sannførdur um, at hon hevur teir vansar, sum ofta hava verið frammi um eina slíka skipan, nevniliga at hon meira enn neyðugt stuðlar uppundir útblaking av fiski. Í ES er tað nevnuliga soleiðis, at tað er álagt fiskimonnum, at fiskur, sum kvota ikki er til, skal "genudsættes". Á hendan hátt skal tað síggja út, sum um fiskurin heldur áfram at liva, hóast tað er ein sannroynd, at ein fiskur sum hevur verið á einum dekki sera sjáldan sleppur livandi frá tí. Lívið hjá fiskimonnum verður ikki lættari av, at tá veitt verður í norskum sjógvi, er forboð fyri at blaka fisk út yvirhøvur. Mogens Knudsen hellir munandi meira til ta føroysku skipanina við fiskidøgum og tekniskum reguleringum, har í hvussu er allur fiskur kemur til sættis.

Síðan eru tað aðrar reglur. Ein teirra er, at tað skal boðast frá til myndugleikarnar hvørja ferð, tað er landað frá einum túri. Verður ikki boðað frá í rættari tíð, verður rokning send uppá ein bót, sum fyrstu ferð er kr. 5.000. Næstu ferð er hon kr. 10.000, og soleiðis hækkar hon hvørja ferð, fráboðanin verður gloymd.

Fyri ídnaðarfisk eru afturat hesum aðrar reglur, sum eru eitt úrslit av tí snýti, sum hevur verið við "umdoyping" av ídnaðarfiski.

Tað er nevniliga als ikki loyvt at landa eina last av ídnaðarfiski, fyrrenn eftirlitismaður er til komin til staðar og hevur tikið royndir av lastini. Hetta kann vera sera trupult, ikki minst tá komið verður inn aðrar tíðir enn vanligar arbeiðsdagar. Tað er nú ikki vist, at tað er møguligt at fáa fatur á eftirlitsmanni sunnumorgun t.d. Hetta kemur serliga illa við í nebbasildatíðini. Hon er stutt, og tá ræður um ikki at liggja inni longur enn longst gjørligt. Og júst í hesi veiði skuldi ikki verið neyðugt við slíkum eftirliti, tí á nebbasildaveiði er talan um nærum "reina" veiði.

Hetta er so fyrsta samband, sum hevur verið millum Fiskimannafelagið og Fiskernes Forbund. Tað er væl hugsandi, at vit fara at taka stig til at fáa eitt meira skipað samband framyvir.




*Hirtshals hevur eisini sínar minningarsteinar av teimum sum eru farnir á sjónum. Hesin steinur er til minnis um teir, sum fórust við bjargingarbátinum R.F. 2, sum forlisti 1. desember 1981.*




*Hetta er skrivstovan hjá Fiskernes Forbund í Hirtshals.*

Fiskimálaráðið

## Fiskivinnuroyndir 2003

- Lýsing eftir ums óknum, 2. umfar

**Hvat er fiskivinnuroyndir?**
Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar undir gransking og menning innan fiskivinnuna.

Fiskimálaráðið hevur gjørt av, at verkætlanir innan fylgjandi økir hava fyrimun:

- Fiskiskapur við ábyrgd .
- Gagnnýtsla av øllum
- Sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans
- Virðisøking av upsatilfeinginum
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, Trygd og Umhvørvi

Somuleiðis er gjørt av, at serligur dentur verður lagdur á nýggjar verkætlanir við atliti at:

- Framleiðslu- og samfelagsbúskap í fiskivinnu á sjógvi og á landi
- Samskipaða skjalfesting av fiskivinnuni t.d. loysnir við "sporføri" og/ella líknandi ávegis tøkniliga samskipan í fiskivinnuni,
- Heilsu, trygd og trivnað í fiskivinnuni

Innan hesi síðstnevndu økir verður tikið í móti umsóknum, sum kunnu hava eina longd uppá upp til 3 ár. Á hinum økjunum kunnu verkætlanir í høvuðsheitum bert varða árið 2003 út.

**Hvør kann søkja?**
Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 2. juni 2003.** Sí adressu niðanfyri.

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst frá á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo. ella Fiskimálaráðnum www.fisk.fo. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Ásmund Guðjónsson, samskipara við møguligum spurningum og øðrum.

*Ásmundur Guðjónsson, samskipari*
**Fiskimálaráðið**
Yviri við Strond 17-19
Postboks 347 · 110 Tórshavn

tel: 353030 · fartel: 228001 · faks: 353035
t-postur: asmundurg@fisk.fo

## Klaksvíkar Sjúkrahús

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 3. juni 2003 og á Landssjúkrahúsinum 5. juni 2003.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 54 63, mánadag og týsdag kl. 10-12, í seinasta lagi 27. mai 2003.

**FF-blaðið**
**á sjógvi og á landi**

# Maskinmeistarar
## søkjast

Søkt verður eftir tveimum maskinmeistarum til at vera feriuavloysari í summar á elverkunum hjá SEV í Suðuroy, ynskt verður, at viðkomandi kann byrja um hálvan mai ella eitt sindur seinni og vera í starvi til uml. mánaðarskiftið august/september í ár.

Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verksmeistara á elverkunum í Suðuroy tlf. 346932 ella til skrivstovu okkara tlf. 346800.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn.

*Tórshavn, tann 30. apríl 2003*

**Elfelagið SEV**

# SØVNINI Í SUMMAR
## Í summar verður opið soleiðis:

**Føroya Fo rnminnissavn**
**Framsýningin í Brekkutúni 6** **tlf. 318076**
**Heima á Garði, Hoyvík**
Í tíðarskeiðnum 18. mai - 14. september:
mánadag - fríggjadag kl. 10 - 17
leygar- og sunnudag kl. 14 - 17
**Avgreiðslan:** **tlf. 310700**
Kúrdalsvegi 2, Hoyvík
mánadag - fríggjadag kl. 09 - 12
& kl. 13 - 15

**Føroya Náttúrugripasavn** **tlf. 312306**
Framsýningarnar á Debesartrøð:
Í tíðarskeiðnum 1. juni - 31. august:
mánadag - fríggjadag kl. 11 - 16
leygar- og sunnudag kl. 15 - 17

**Føroya Landsskjalasavn** **tlf. 316677**
Í tíðarskeiðnum 1. juni - 31. august
er lesistovan opin:
mánadag, týsdag, hósdag
og fríggjadag kl. 10 - 16
mikudag og leygardag stongt

**Føroya Landsbókasavn** **tlf. 311626**
Í tíðarskeiðnum 16. juni - 15. august:
mánadag - fríggjadag kl. 13 - 17

**Býarbókasavnið** **tlf. 313626**
hevur opið sum vant:
mánadag - fríggjadag kl. 10 - 18
leygardag kl. 10 - 13

**Listasavn Føroya** **tlf. 313579**
Í tíðarskeiðnum 1. juni - 1. september:
mánadag - fríggjadag kl. 11 - 17
leygar- og sunnudag kl. 14 - 18

Tórshavn, 15. mai 2003
**Søvnini**

# Fíggjarstyrkur tøkur til upplýsingarverkætlan um súgdjór í havinum

NAMMCO – the North Atlantic Marine Mammal Commision (nevndin viðvíkjandi súgdjórum í Norðuratlantshavi) – er ein altjóða stovnur, sum samstarvar um at varðveita, umsita og kanna allar hvala- og kópastovnar í Norðuratlantshavi.

Endamálið við NAMMCO-grunninum er at medvirka til, at almenningurin fær holla vitan og kunnleika um súgdjór í havinum, og hvussu vit gagnnýta tey burðardygt.

Verkætlanin eigur at miða ímóti at geva almennar heldur enn tøkniligar upplýsingar. Evni, sum viðgerast skulu, kunnu t.d. vera náttúruvísindi, ið viðger havsúgdjór, lívfrøði, vistfrøði, og hvønn týdning tær ymsu vistfrøðiligu skipaninar hava. Veiða upprunafólka og tann vitan, tey hava um súgdjóralívið í havinum, kann eisini takast upp til viðgerðar.

Tey, ið studning fáa, eiga helst at hava okkurt tilknýti til øll NAMMCO - limalondini (Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg). Men verkætlanir, sum hava týdning hjá onkrum einstøkum limalandi ella -londum, verða eisini tiknar upp til umhugsingar. Í 2003 er nevndin í NAMMCO-grunninum serliga áhugað at viðgera verkætlanir, sum geva vitskapliga rættar stovnsupplýsingar, og sum viðgera bæði søgulig og nýggj veiðutøl.

Grunnurin kann lata upp til 50% í studningi til verkætlanir, ið lúka áðurnevndu krøv.

Tøki grunnpeningurin í 2003 er 100.000 norskar krónur tilsamans.

**Politikkur NAMMCO-grunnsins, og hvar umsóknir vera stílaðar**, ella fleiri upplýsingar um grunnin fáast við at venda sær til NAMMCO-skrivstovuna, Polar Environmental Centre, N-9296 Tromsø, Noreg, og á heimasíðu okkara.

**NAMMCO**
Tel.: (+47) 77 75 01 80 · Fax.: (+47) 77 75 01 81
T-postur: nammco-sec@nammco.no
Heimasíða: www.nammco.no

***Umsóknarfreistin er úti 1. juni 2003.***

## Óli Wolles:

# Absalon Guttormsen í Útistovu á Trøllanesi

## 1830 - 1902

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 11, 12, 17 og 18 kunnu takast úr blaðnum

**Hetta er 2. partur av frásøgnini, sum Óli Wolles, oldurabbasonur Absalons, skrivaði í 1982.**



*Hesin træskurður av Fritjof Joensen stendur inni í Avhaldshúsinum í Mikladali.*

**Absalon og avhaldsrørslan**

Hóast Absaloni dámdi væl at drekka sum ungur, gjørdist hann seinni ógvuliga íðin avhaldsmaður. Nær hann gjørdist avhaldsmaður, er ikki heilt greitt, tí hann hevur eitt sindur ymiskar frágreiðingar; men helst hevur tað verið í 1865, 35 ára gamal.

Í Fuglaframa nr. 18, 1900, sigur hann, at norðmaðurin Asbjørn Kloster kom til Føroya saman við einum breta í 1863. Teir stovnaðu avhaldsfelag í Suðuroy, og tá hann eini 2 ár seinni fór til Suðuroyar, teknaði hann seg upp í hetta felagið. Tað má so hava verið umleið 1865. Men í Fuglaframa 13/12-1898 skrivar hann, at hann hevur verið í avhaldsfelagi í 38 ár, t.v.s. síðani 1860. Hvat felag hann her meinar við, dugi eg ikki at síggja, tí tað fólk vita um, vóru ongi avhaldsfeløg frá tí Brennivíns-Magnus roysndi at stovna felag í 1846-48, og til Asbjørn Kloster stovnaði felag í Suðuroy í 1863. Her er soleiðis ógreitt, um hann hevur verið í avhaldsfelagi síðan 1860 ella 1865.

Men tað er møguligt, at Absalon í sínum frágreiðingum bert hevur hugsað um gongdina í málinum, og als ikki lagt í nágreiniligar tíðarfestingar, serliga í greinini í Fuglaframa í 1898, har hann bert nevnir áramálið í øðrum sambandi. Og sostatt er kanska ikki rætt at festa seg við árstølini.

Ein møgulig frágreiðing kann tó vera, at greinin í Fuglaframa 13/12-1898 er bræv frá Absaloni, ið sjálvandi hevur verið hondskrivað. Tað kann hugsast, at blaðið tá hevur lisið eitt 3-tal fyri eitt 8-tal, soleiðis at rætta talið skuldi verið 33 ár, t.v.s. síðani 1865, og so samsvarar við samrøðuna í Fuglaframa nr. 18, 1900. Men hetta er tó bert eitt git.

Komin norður aftur royndi hann at eggja til fráhald millum manna. Um 1869 stovnaði Ernst B. Wesenberg, prestur á Viðareiði 1866-1871, eitt mátahaldsfelag í Mikladali. Hann fekk nakað av undirtøku, men tá hann var deyður á sumri 1871, byrjaði felagið at minka, og at enda vóru teir bert 3 limir eftir: Michel Peter Eliasen, Mikladal, Jacob Joensen, Trøllanes og Absalon sjálvur.

Í Fuglaframa nr. 18, 1900, sigur hann eitt sindur øðrvísi frá. Har sigur hann, at afturkomin úr Suðuroy royndi hann sum frægast, oftast einsamallur, men í 1875 fekk hann 2 afturat sær, seinni aftur 2, og soleiðis gekk so smátt framá har í oynni.

Um ein roynir at seta hesar frágreiðingar saman, kundi verið líkt til, at Absalon hevur roynt einsamallur, til mátahaldsfelag hevur verið stovnað í 1869, men tá Wesenberg var deyður í 1871, man limatalið skjótt hava verið minkandi, so bert teir 3 nevndu hava verið eftir. Eftir 1875 er so farið at ganga framá aftur, og í 1881 "forandrede vi vort løfte til totalafhold", sigur hann í blaðnum Dúgvuni nr. 5 í 1894. Eftir hetta vunnu teir nakrar limir afturat, og í 1883 hevði felagið ikki færri enn 23 limir.

Um heystið 1882 kallaði hann til fundar á Húsum, og har skrivaðu nakrir undir totalavhaldslyftið. Felag varð tó ikki stovnað á Húsum, teir, ið skrivaðu undir lyftið, gjørdust limir í Norðoya Avhaldsfelag, sum óivað var tað sama, sum mikladalsmenn vóru í.

Tá hetta felag seinni upploystist, stovnaðu teir avhaldsfelag fyri Kalsoynna. Hetta hevur helst verið í 1883, sum er stovningarár hjá Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag. Nøkur ár seinni, helst í 1885 varð hetta býtt sundur í Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag og Húsar Sóknar Fráhaldsfelag.

Upprunaliga vóru hesi feløg bert fyri mannfólk, men í 1887 varð loyvt kvinnum eisini at tekna seg sum limir.

Í 1897 vita vit úr Dúgvuni, at Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag hevur 60 limir. Í nevndini sita elsti sonur Absalons, Poul Johs. Østerø, formaður, og 2 mikladalsmenn. Felagið á Húsum hevur um hetta mundið 38 limir, 15 menn og 23 kvinnur.

14. apríl 1884 var Absalon við til at stovna Viðareiðis Sóknar Fráhaldsfelag, óivað saman við prestinum, Jørgen C. F. Nielsen.

Skírishósdag 1887 kallaði Absalon til fundar í Kunoy. Til henda fund var fólk bæði haðani úr bygdini, av Skarði og úr Haraldsundi. Sama dag varð "Kunø Sogns Totalafholdsforening" stovnað við 19 limum. Stjórn varð tó ongin vald, men Absalon átók sær sjálvur at hava leiðsluna av felagnum. Ikki fyrr enn í 1894 varð stjórn vald, og nú kom Absalon ikki í stjórnina. Nú mundi hann halda felagið vera búgvið at standa sjálvt. Tá hevði felagið 28 limir, 21 menn og 7 kvinnur.

Í Fuglaframa nr. 18, 1900 sigur Absalon frá, at eftir at hava stovnað felagið í Mikladali, fór hann at ferðast víðari. Hann var um allar Norðuroyggjar og eystursíðuna av Eysturoy. Í Norðuroyggjum fekk hann stovnað feløg í Kalsoy, Kunoy, Viðoy og Svínoy. Í Fugloy og í Bø (Klaksvík) vóru feløg, men har hevði hann ikki verið uppi í.

Í Eysturoy hevði hann verið við til at stovna feløg við Gjógv, í Funningi, Elduvík, Fuglafirði og Gøtu.

Í Dúgvuni nr. 6, 1898 sæst, at Absalon eisini hevur verið felagnum í Lorvík dyggur stuðul, eftir at stovnarin, Missionær Rask, var farin.

Um 1894 var byrjað at halda fólkafundir ymsastaðni um oyggjarnar. Avhaldshugaðir menn hava ivaleyst sæð, at her var ein møguleiki og ein uppgáva hjá avhaldsfeløgunum. Og í Føringatíðindum nr. 10, 1895 lýsa Absalon Guttormsen, Trøllanes; M. P. Joensen, Trøllanes; Z. M. Zachariasen, Fugloy og Absalon M. Joensen, Gerðum, til fólkaavhaldsfundar á Áarskarði á Borðoynni 3. Hvítusunnudag 1895.

Í næsta nummari av Føringatíðindum er frásøgn frá fundinum. Veðrið var gott og um 300 fólk høvdu verið á fundi. Nógvar røður høvdu verið hildnar, bæði av Absaloni og øðrum.

Men arbeiði at elva til avhald millum manna var ikki so lætt. Eitt var, at hetta var lítið virt av teimum flestu, kanska serliga tá hann hevði fáar afturat sær. Annað var, at mótstøðan var hørð, eisini haðani ein ikki skuldi vænta tað.

Í Fuglaframa nr. 17, 1898 skrivar hann um fólkafund, ið verið hevur við Sandsvatn. Óvíst er, um Absalon hevur verið á hesum fundi, tí hann byrjar við at sipa til fundarfrágreiðing í Fuglaframa nr. 7, og ger viðmerkingar til tað, ið sagt hevur verið út frá hesi fundarfrásøgn, (og har er hann ikki nevndur røðari). Har høvdu millum røðararnar verið onkrir, ið høvdu tosað um tvingsil í avhaldsfeløgunum, og hesum er tað, hann vísir aftur. Tey, ið koma upp í avhaldsfeløg, koma av fríum vilja og av egnari sannføring, so tað er ikki talan um nakran tvingsil. Hin vegin, sigur hann, eru tað nógv, ið fegin vildu lagt av at drukkið, men tey kenna seg ov bundnan av brennivíninum, so har er talan um tvingsil. Men nakran tvingsil innan avhaldsfeløgini kann ikki vera talan um.

Eitt annað mál, ið nógv stríð var um, var um avhaldsfeløgini skuldu vera kristilig ella ikki. Í Dúgvuni nr. 11, 1899 viðger Absalon hetta evni. Her verjir hann avhaldssakina móti tí, ein hevur skrivað um "ta beinastu leiðina"



Gledeligt er tað at vit er tó komin
so langt.
Eg les igjar í Dimma: at allan
er at holda eit nordiskt Kvinne-
møte í Kristiania – Hevði
iún bara onkun førist.
Kvinnurnar tike ser inn rajði
at fare kurlit – Eg eri bangin
fyre tí – Hvis eingin fer vil tað
gera meg ilt, men eg kan
einki gera fyre tað –
Lat meg vóna tað besta –
So geve upp herferð, eg vóne
at hoyra frá tygum nakað sjótt –
Eg legge hettar breve til
góðanis indani tygara: av tí
orsøk at – møveliga verið Rigs-
dagerin sluttaður tað hetta bræv
kemur fram – so veit eg ikki
hvørre hann ræddr – so eri
tygum so beinaram at beina
tað til hansara – tygum veta
vel hvør hann býr –
Heil ok Sæl
Vinmaðurin tygara
Absalon Guttormsen

*Bræv frá Absalon á Trøllanesi til Mariu Mikkelsen.*

*Framhald á næstu síðu*

hjá avhaldsfeløgunum at virka eftir.

Hesin heldur, at um avhaldsfeløgini bert geva fólki ta røttu fatanina av kristindóminum, so fer rúsdrekkanýtslan at minka av sær sjálvum. Hetta heldur Absalon ikki, tí tá rúsdrekkanýtslan framvegis er ógvuliga stór, má tað merkja, at fólk enn ikki hava fingið ta røttu fatanina av kristindóminum. Og tá nógvir prestar í nógv hundrað ár ikki hava megnað at givið fólki ta røttu fatanina av kristindóminum, so hevur hann lítla vón um at Dúgvan ella avhaldsfeløgini skulu klára tað. Hartil er at siga, at "kristiligheit" og kristindómur eru ógvuliga "elastisk begreb", sum hann málber seg. Og hann metir hetta tí als ikki at vera endamál felaganna.

Í Dúgvuni nr. 5, 1900 er málið aftur fyri. Her skrivar hann móti Sandoyarpresti, ið eisini var íðin avhaldsmaður. Hesin hevði í "Færøsk Kirketidende" havt so nógv at funnist at frammanfyri nevndu grein hjá Absaloni, og nú roynir Absalon so aftur at verja avhaldssakina:

Tá tað í viðtøkum felagsins stendur, at religión og politikkur skulu haldast uttanfyri, meinast tað við, skrivar hann, at tey, ið eru samd um avhaldsmálið, eiga at standa saman í felagi, uttan mun til átrúnaðarliga ella politiska áskoðan. At tey eru ósamd í einum, eigur ikki at skilja tey í tí, sum tey eru samd um, og tað kann einans gerast við at halda tað uttanfyri, sum tey eru ósamd um. Endamál felagsins er jú at savna tey, ið vilja avhaldssakini frama.

Hvussu neyðugt tað er at semjast og standa saman um avhaldssakina, mundi hann hava lært av teimum árum, hann fyri tað mesta var einsamallur. Í Fuglaframa nr. 18, 1900 sigur hann millum annað soleiðis: "Men eg eri tó altíð bangin fyri, at afturstig kann koma, tí eitt er at vera góður avhaldsmaður, annað at vera góður avhaldsfelagmaður. Tað er samanhaldið, sum skal styrkja og halda uppi og fyribyggja fráfall."

Eitt tak var at stovna avhaldsfeløg, men tað tyngsta takið mundi mangan vera at halda teimum á lívi. Teir, ið vóru limir í avhaldsfeløgum, mundu fyri tað mesta vera menn, ið høvdu lagt av at drekka, og teimum tørvaði tí allan stuðul fyri at halda tað,



*Hetta er felagshúsið hjá Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag, sum er tað mest sjónliga minnið eftir Absalon. Og sjálvt 100 ár eftir at Absalon er deyður, er hetta kanska mest virkna fráhaldsfelag í landinum við limatali, sum er fleiri ferðir íbúgvaratalið í sóknini. Ávirkanin er eisini eyðsýnd tann dag í dag. Fyri nærum 40 árum síðan segði tann tá nývaldi stjórnarlimurin í FF Andrass Olsen, at hann hevði ongantíð sæð fullan mann í Kalsoynni, og hetta er ikki nógv øðrvísi í dag.*

teir høvdu sett sær fyri.

At tað mundi vera torført hjá mongum, sæst í frágreiðingum, ið javnan vóru í Dúgvuni, um gongdina hjá teimum ymsu feløgunum. Har sæst, at ofta koma limir afturat, men næstan líka ofta er at síggja, at onkur hevur meldað seg úr felagnum ella er strikaður sum limur.

Fyri at royna at stuðla sum frægast plagdi Absalon tí javnan at vitja tey ymsu feløgini, men við aldrinum mundi hetta gerast meiri sjáldan.

Í Fuglaframa nr. 18, 1900, sigur hann eisini frá, at ta fyrstu tíðina royndi hann at vitja hesi feløg nakað ofta, men nú, tey seinastu 3 árini, hevur hann ikki verið á vitjan, hann orkar so lítið longur. Spurdur um hvussu støðan man vera, heldur hann, at summi eru kanska útdeyð, onnur hava kanska bara heilt fáar limir, hann veit ikki vist. Nú man hesin so ídni avhaldsstríðsmaður vera farin at eldast, tí hann sigur seg ikki hætta sær at royna umaftur.

Ár 1900 verður eitt landsfelag fyri avhaldsfeløgini stovnað. Hetta felag kallast "Færøernes Afholdskreds." Fleiri feløg gerast limir í hesum felag, og teirra millum eru Mikladals-, Viðoyar-, Húsar- og Kunoyar Sóknar Fráhaldsfeløg.

Í hvussu er, umboðar Absalon Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag á fundi í Færøenes Afholdskreds í Havn í 1901, og umboð eru fyri nevndu feløg. Har verða ymisk mál viðgjørd og fundarfólkið heitir á Absalon at vitja feløgini, fyri harvið at stuðla avhaldssakini. Hesi áheitan játtar hann fegin at fylgja, so frætt sum hann, vegna aldur, er mentur.

At Absalon eitt ár eftir, at hann hevur sagt seg at orka so lítið, og at nú var so langt millum ferðirnar, fegin játtar at ferðast til feløgini at vitja, er tekin um, at arbeiðshugurin og viljin at virka fyri avhaldssakini eru líka góð enn, hóast megin er farin at ganga undan.

Hetta sigur hann eisini í brævi til Mariu Mikkelsen so seint sum í marts 1902: "Evni míni minka, men hugurin og viljin er enn sum fyrr..."

Absalon var avhaldsmaður, og hann vildi, at tað skuldi síggjast. Tí gekk hann altíð, bæði gerandis og heilagt, við eyðkennismerkinum, avhaldsstjørnuni, á bringuni. Hesum merki, sum hann hevði fingið frá felagnum á Viðareiði sum tøkk fyri virki sítt har.

**Absalon og Føringafelag**

Eitt annað mál, ið lá Absaloni ógvuliga tungt á hjarta, var at fáa føroyska málið aftur til heiðurs.

Sjálvur sigur Absalon í Dimmalætting nr. 49, 1895, í greinini "Maalstrævet" soleiðis frá um áhuga sín fyri føroyska málinum: "Jeg har fra først jeg kunde skønne interesseret mig særdeles for vor nationalitet og modersmaalet - dog at jeg ikke har kunnet udrette synderligt til dets fremme..." , og í Fuglaframa nr. 18, 1900, sigur hann soleiðis frá: "Alt frá tí at eg sum ungur fekk fætir á Schrøtars Matthæi evangelium, følde eg kærleika til móðurmálið, og alt síðan hevur tann hugsan mentst í mær at vit fyrst og fremst mugu royna at halda uppá okkara føroysku grund undir øllum okkara lívi, yrki og framburðsstarvi."

Tann 22. des. 1888 stendur soljóðandi lýsing í Dimmalætting: "Ein og hvør bjóðast at koma í tinghúsið annan jóladag kl. 3 e.m. har sum vit ætla at samráðast um at verja Føroya Mál og Føroya siðir." Sonevndi Jólafundurin var so hildin, og har vóru nógvar røður hildnar. Áðrenn fundurin var lokin, varð samtykt at kalla aftur til fundar í Avhaldshúsinum í Havn 6. januar 1889. Har varð so meiri røtt um málið, og stovnandi aðalfundur Føringafelags var hildin 27. jan. 1889.

Um Absalon var á hesum fundum, er óvíst, men eitt er vist: hetta vóru hansara hjartamál, ið vóru til umrøðu: at verja Føroya mál og Føroya siðir. Ella sum stevnuskrá felagsins ljóðar: 1) at fáa Føroya mál til æru, og 2) at fáa føroyingar til at halda saman og ganga fram í øllum lutum og gerast sjálvbjargnir.

Hetta vóru sanniliga ætlanir, ið Absalon kundi taka undir við, og tað gjørdi hann eisini. Hann var til tað seinasta limur í Føringafelag og royndi altíð at vera við til fundir felagsins og onnur tiltøk, málinum at frama, so sum fólkafundir og annað.

Hvørja ólavsøku fór hann eisini vanliga ta longu leið til Havnar á aðalfund í Føringafelag, og tað var ikki so lítið fyrilagt fyri ein gamlan mann. So eyðsæð er, at hetta var honum eitt hjartamál.

Tá fólkafundir vóru hildnir ymsastaðni um oyggjarnar, var hann ógvuliga trúgvur luttakari. Og ofta vita vit, at hann var millum røðararnar, og tá serliga, um avhaldsmálið var havt frammi.

Men kanska serliga í tí smáa og minni sjónliga var hann ein trúgvur Føringafelagsvinur. Hann stuðlaði teimum ungu og royndi at mæla teimum til at halda á at strevast, inntil málið var nátt. Hann hevði eisini brævasamband við fleiri og royndi á tann hátt at stuðla teimum. A.C. Evensen sigur soleiðis í minningarorði í Búreisingi í 1902, at hann í stóran mun kann takka Absaloni fyri sín andaliga vøkstur.

Absalon vildi eisini hava kvinnurnar upp í part, væl vitandi, at tær mundu hava stóra ávirkan á uppvaksandi ættarliðið. Í Fuglaframa nr. 11, 1900, skrivar hann grein undir yvirskrivtini "Hví eru vit so tigandi?" um at fáa kvinnurnar við til "at røkja so um alt vakurt og gagnligt, at land okkara altíð verður okkum øllum ein betri og betri bústaður." Í hesi grein tekur hann undir við tí, ið ein kvinna hevur skrivað umleið ár frammanundan; hann er nú farin at ótolnast eftir úrsliti.

At Absalon m.a. við brævasambandi royndi at



*Fremst síggja vit Útistovu, har Absalon var bóndi og so nógv annað. Aftanfyri er Innistova, haðani Poul, sum er umrøddur aðra staðni í blaðnum, var ættaður.*

Framhald á síðu 17

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



# Føroyar í Hirtshals

Tað er neyvan nakar danskur býur, sum er so merktur av Føroyum og føroyingum, sum Hirtshals. Hetta samband stavar heilt aftur til fyrst í 60-ini, tá Eiler Jacobsen gjørdi hol í sjógvin við sildaveiðini í Norðsjónum, sum fyrst og fremst gekk út frá Hirtshals. Tá byrjaðu føroyskir fiskimenn eisini at búseta seg í býnum. Undir kreppuni fyrst í 90-unum, tá nógvir føroyingar fluttu av landinum, valdu nógvir teirra Hirtshals at búgva í. Teir hildu Hirtshals vera mest heimligan. Hóast fleiri er farnir heim aftur, so eru tað framvegis nógv til av føroyingum her. Roknað verður við, at tað búgva umleið 15.000 fólk í Hirtshals. Av hesum verður mett, at umleið 10% eru av føroyskum uppruna. Verður hugt í telefonbókina sæst, at her eru ikki færri enn 22, sum eita Joensen, ella eins nógv og í eini hampiligari størri føroyskari bygd.

FF-blaðið var páskatúr í Danmark við "Norrönu". Tað skal sigast, at tað er alla æru vert, at Smyril Line útvegar bólkum, húskjum og ikki minst barnafamiljum hendan møguleikan at fáaa ein bíligan ferðartúr av landinum.

Vit vóru í Blokhús einar 100 km. norðanfyri Hanstholm saman við fleiri hundrað øðrum føroyingum. Í blaðnum í dag eru fleiri áhugaverdar og forkunnugar frásagnir úr Blokhus.

Men Blokhus liggur ikki so langt frá Hirtshals heldur, so høvið varð nýtt at vitja tann vegin. Og her er nógv føroyskt virksemi. Her eru skip, sum føroyingar eiga. Teir eiga nærum helvtina av nótaflotanum í býnum. Her eru virki, sum geva nógv arbeiði og virksemi í býnum, og her er eisini kristiligt virksemi í "Malta", sum savnar nógvar føroyingar.

Vit vitjaðu eisini Fiskernes Forbund, sum mest av øllum kann sammetast við FF, men frásøgnin frá hesi vitjan kemur í komandi blaði.

Hesaferð fara vit at hava eina myndalýsing, sum hóskandi kann kallast Føroyar og føroyingar í Hirtshals, og sum sæst, er hetta samband fyri ein stóran part knýtt at fiski.




*"Tinganes". Hetta er eitt kent føroyskt navn, eisini sum skipanavn.*




*Strømfjord hjá Asbjørn Magnussen. Asbjørn er ættaður úr Miðvági og kona hansara Bjarma er úr Lopra. Asbjørn var við "Grími Kamban", tá hann fekk kraftblokk í 1965. Síðani hevur kraftblokkur verið hansara lív.*



*"Beinir" hjá Virgari Tindskarð, sum er ættaður úr Skálavík. Virgar er eisini ein av kraftblokkaveteranunum í Hirtshals.*



*Her síggja vit part av manningini á Strømfjord, Asbjørn, Óla Martin Christiansen, John Mikkjal Godtfred og Fríði, sum er sonur Asbjørn, og sum eisini siglir við. Asbjørn letur væl at gongdini hjá donsku kraftblokkaskipunum. Teir hava ikki kvotur til veiðu í meira enn helvtina av árinum, men fyri ta tíðina teir kunnu veiða, hevur gingist væl. Beint nú rigga teir til at fara á nebbasildaveiðu, sum ikki er vanlig veiða hjá kraftblokkaskipum. Men teir vóna at kunna drýggja kvoturnar á hendan hátt. Við nebbasild er tað tó soleiðis, at summi ár er heilt nógv at fáa og onnur ár lítið og einki. Byrjanin í ár hevur tó ikki verið heilt so góð sum ynskiligt, men hetta kann broytast so knappliga.*



*Tveir kraftblokkaveteranar Gullak Madsen og Asbjørn. Umframt at vera reiðari er Gullak eisini umboðsmaður fyri sápuna hjá Kemilux, sum er væl umtókt í Danmark. Seld verða eini 200 tons árliga, men vónir eru sjálvsagt um at fáa hetta tal økt.*

**Framhald á næstu síðu**




*"Ruth" hjá Gullaki Madsen úr Kvívík, sum er giftur við Tove úr Havn. Gullak sigldi í nógv ár við "Sólborg". "Ruth" er tann gamli "Havlot" ella "Skálafossur" ella "Leivur Hepni", sum seinast í 60-unum varð bygdur sum línuskip, sum tó fyri tað mesta fiskaði við gørnum undir Grønlandi. Gullak umhugsar at fáa sær nýtt skip.*



*"Herdis J" hjá Sigmundi Jacobsen, Mundi, sum er ættaður úr Nólsoy. Hann er giftur við Sigvør, sum eisini er úr Nólsoy. Eins og við Asbjørn, so byrjaði Mundi sína karrieru sum kraftblokkari við "Grími Kamban" í 1965. "Herdis J" er fyrrverandi "Gøtunes", sum hoyrdi heima í Fuglafirði.*



*Fiskasølan hevur í nógv ár havt eitt stórt virksemi í Hirtshals, men hetta er nú á fallandi fóti. Upprunaliga vóru 2 starvsfólk hjá Fiskasøluni í Hirtshals. Virksemið vaks, og tað kom uppá 25, tá tað var hægst, og er nú aftur niðri á 2. Hetta merkir, at virksemið er sera avmarkað. Men teir standa fyri nakað av pakking av føroyskum fiski, sum fer fram á frystihúsi í býnum.*



*Starvsfólkini, sum eru eftir á Fiskasøluni, eru bæði donsk. Nina Christiansen hevur starvast her í 22 ár, so hon hevur sjálv upplivað aldurnar í føroysku fiskivinnuni, soleiðis sum eisini Fiskasølan hevur upplivað tær.*



*Leiðarin á Skipafelagnum í Hirtshals er Morten Neve Jensen.*




*Faroe Ship, Skipafelagið Føroyar, er eisini umboðað í Hirtshals. Hetta er ikki so løgið, tá hugsað verður um, at Hirtshals er ein av havnunum hjá Skipafelagnum í Danmark. Her arbeiða tilsamans 20-30 fólk, øll eru danir. Umframt at avgreiða skipini hjá Skipafelagnum verða eisini rutur hjá øðrum skipafeløgum t.d. til Noregs avgreiddar. Afturat hesum verður skipað fyri flutningi av vørum við lastbilum og trailarum til lond longur suðuri í Europa, eins og tað eisini verður skipað fyri flutningi millum lond í Europa. So her er talan um eitt munandi íkast til føroyskt virksemi.*




*Ein heilt stór fyritøka í Hirtshals er Vestlax, har vestmenningurin Jógvan Djurhuus er stjóri. Tíverru eydnaðist ikki at hitta hann. Men hann stendur fyri virkisbygningum ymsa staðni í býnum, so tað er eingin ivi um, at Vestlax er, í Føroyum sovæl sum í Danmark, ein stórfyritøka.*

**FF-blaðið**
**á sjógvi og á landi**



*Elsa Djurhuus stákaðist í køkinum á Malta, har hon og maðurin Poul Johan hava búleikast og virkað eitt skifti. Elsa er dani, men er ein av teimum fáu dønunum, sum tosa føroyskt. Hennara tilvera í Føroyum hevur verið dramatisk. Elsa var fyrst gift við Brynleif Hansen, sum doyði í flogvanlukkuni í Mykinesi í 1970. Sigast kann stutt um Elsu, at henni dámar føroyingar, og ikki minst: føroyingum dáma hana fyri hennara vinarligu medferð og hjálpsemi. Tí er hon ein av okkara.*



*Her síggja vit William og Huldu. William er ættaður úr Klaksvík, sonur Sterka-Jákup. Eins og fleiri av hansara beiggjum hevur William verið fiskimaður stóran part av lívinum. Saman við soninum Edmund hevur hann seinastu 10 árini havt ein sandbát í Danmark. Hetta er framvegis "veiða", men eitt sindur øðrvísi enn eftir fiski. Hulda er ættað úr Gásadali. Nú verður skjótt lættari hjá henni at koma aftur á gamlar leiðir.*



*Teksturin til hesa mynd kundi verið, at her síggja vit ein sjómann og ein landkrabba. T.v. er tað Edmund Joensen, sonur Williams, sum saman við pápanum hevur "veitt" sand. Frá honum fekst at vita, at sandur er ikki bert sandur. Jammerbugten, beint sunnanfyri Hirtshals við sínum 30 km. av sandstrond, skuldi verið eitt gott "mið", men Edmund sigur, at tað hjálpir ikki so nógv, tí hesin sandur kann als ikki brúkast. T.h. er Hjørleif Vang úr Kaldbak, sum beint hevur verið í Hollandi í brúðleypi hjá soninum. Hjørleif er elektrikari, men hevur tó roynt nógv á Kaldsbaksfirði við gørnum eftir sild.*

*Føroyskir fiskimenn í Hirtshals. f.v. Jón Nystrøm úr Klaksvík, Óli Nattestad úr Skálavík og Thorvald Thomsen úr Klaksvík. Teir eru avmyndaðir inni á Malta 2. páskakvøld.*






# Næsta sakarmálið verður um samdøgursfrádráttin

Tann, sum fæst við almennar mynduleikar, veit, at tað ber ikki til hjá einum borgara at fáa viðhald, uttan mun til hvussu væl hann kann undirbyggja síni sjónarmið.

Hetta verður væl og virðiliga lýst av teimum rættarmálum, sum eru umrødd í blaðnum í dag.

Men vit í FF eru so væl fyri, at vit vita, nær vit hava rætt. Vit duga at lesa lógir eins væl og nakar annar. Tað var nevniliga ongantíð ivi um, at vit fóru at fáa viðhald í teimum málum, har hetta hendi.

Næsta mál, vit leggja fyri rættin, verður um samdøgursfrádráttin hjá fiskimonnum uttanlands, sum er umrøddur í fleiri FF-bløðum. Hetta er eitt mál, har vit eru á heimabeiti, og vit vilja siga við so nær 100% vissu, sum tað letur seg gera, at her verða fiskimenn við útlendskum skipum frátiknir teirra lógligu rættindini.

Tí verður hetta næsta rættarmál, sum farið verður í holt við.


Føroya Sjómansskúli
Maritime College



Útbúgving

Nú er tíð at søkja um upptøku

Við eini útbúgving frá Føroya Sjómansskúla liggja øll heimsins høv opin fyri tær. Lærugreinarnar fevna um siglingarfrøði, skipstøkni, lastaviðgerð, samskifti, veðurfrøði, skipsfyrisiting, leiðslu og samstarv, maskinfrøði, samfelt skipsræði, føroyskt, enskt, danskt, rokning, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, digitaltøkni, sjórætt, virkisbúskap, sjóregluf, heilsufrøði, fiskivinnu, teld, umframt ýmisk skeið.

Heimaskipari
1. hálvár | 2. hálvár

Skipari
3. hálvár

Skipsførari
4. hálvár
5. hálvár | 6. hálvár

Skúlin byrjar mánadagin 4. august 2003

**NB! Í summar verða fyri seinastu ferð næmingar tiknir inn eftir galdandi skipan. Í januar 2004 verður tikið inn eftir tí nýggju skipanini, har m.a. heimaskiparaprógvtøkan fellur burtur.**

Meiri læst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Sefarlsstyrelsen og IMO*

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 357500
Fax +298 357502
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

AGN



sild
kúfiskur
makrelur
høggusløkkur

hava dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR · telefon: 447720
ella 448095 · fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI



Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

Sp/f Úrvalsbilar
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704


## Fiskiloyvi til bólk 5D til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður fiskiloyvi til bólk 5D selt.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.


Skrivstovusamstarv
Advokatvirkið
Páll Nielsen, adv. — Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. — Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 312227 · Fax 312241 · e-mail: jus@post.olivant.fo
telefontíð kl. 10-12 & 14-16 / fríggjad. 13-15

stuðla teimum ungu, ikki minst kvinnunum, at halda á at berjast fyri málinum og fosturlandssakini, framgongur eisini av brøvum, ið hann hevur skrivað til Mariu Mikkelsen 1900-1902. Hesi brøv eru á Landsbókasavninum. Absalon er tá umleið 70 ára gamal og Maria Mikkelsen, ið hann skrivar til, er eini 24 ára gomul.

Tað er skilligt at hann skrivar fyri at stuðla teimum ungu at halda á at virka fyri teimum sjónarmiðum, hann sjálvur hevði strítt fyri, tí at nú eru hansara tíð og hansara evni farin at ganga undan. Í brævi dagfest á Trøllanesi 23. aug. 1900 skrivar hann:

"Eg havi vilja virka naka, ta kenna tigum Maria. Líte er útav kome, men ugge eg meg vi at ta kanska er ikke retteliga ejnkje.

Lítil vóre virkje evnene til, ok [og] nú er, sum veraman, so pinkalítið ettir, nú due eg ejnkje uttan at rópa upp ok lýta upá hine, sum eg halde naka gott bigva í ok kan venta naka burturúr.

Nú ere tigum góða Maria! ejn av tejmum, sum eg vente naka burturúr - tífyre hesar reglenar - fyre at skygva ejtsindir undir tigum..."

Her sæst heilt greitt, hvussu hann heldur, hann frægast kann stuðla fosturlandssakini. Og serliga heldur hann tað hava týdning at fáa kvinnurnar at fara til verka. Seinni í sama brævi nevnir hann tað, hann hevur skrivað til Fuglaframa undir yvirskriftini "Hví eru vit so tigandi", nr. 11, 1900, og so skrivar hann:

"...Eg vilde fegin kent tað "kvinnena", so eg fekk snakka vi hana - mær domde so val tað hon seje - men gakk -.

Nú tigum góða Maria, takje tigum um rojgj, rojne at foa kvinnenar ret



*Fremsta húsið er Uppistova, haðani m.a. Símun Johan Wolles og Finnbogi Ísakson eru ættaðir. Síðani Innistova og Útistova.*

at taka fat. Fir kemir ikkje tan retta gongdin, framburs arbejðe, tað retta sanna ok góða..."

Og í brævi í juni 1902 skrivar hann til Mariu m.a. um norðurlendskt kvinnumøti, ið skal vera og sigur: "...illa ser ut at nakar fer fra Førjum, tí ejnki hejrist enn. Tað er kanska ejngin, sum er væl førur at fara... verur tað ikke Anna Debes sjolv, ...men eg vejt onga, sum er betre før - uttan Maria í Dalastovene?...

Tó kansje er nú allarejda øll góð týð forlopin nú til at snakka um hettar, ellar hevði eg haft sera góðan hu til skigva undir tigum."

So greitt er, at hann heldur tað vera umráðandi, eisini at fáa kvinnurnar við í arbeiði.

Tá Føringatíðindi byrjaðu at koma, mundu tey vera kærkomin, tí hetta var eitt amboð til at stuðla móðurmálinum og tí, ið føroyskt var. Føringatíðindi vóru skrivað á Hammershaimbs-føroyskum, skriftmálinum ið gjørt var næstan hálvthundrað ár frammanundan, men tó ongantíð hevði vunnið frama millum manna.

Men minni enn 3 ár eftir, at Føringatíðindi byrjaðu at koma út, tók ósemja seg upp innan felagið. Nú var ein nýggj rættskriving komin, skrivingarháttur Jakob Jakobsens, ið mettur var at vera lættari at læra, tí orðini skuldu stavast sum tey verða søgd. Og summir vildu hava, at blaðið nýtti hesa stavseting, aðrir ikki.

Tá henda ósemja tók seg upp innan felagið, um hvør stavseting var rættari og hvørja blaðið skuldi nýta, royndi Absalon av øllum alvi at arbeiða ímóti, at felagið skuldi fara í tvíningar av hesum spurningi. Hann metti tað als ikki at vera endamál felagsins at avgera, hvussu føroyskt skuldi stavast, men heldur at fáa føroyska málið aftur til síni rættindi. Hann legði stóran dent á, at tað átti ikki at gerast til stríðsmál í felagnum; tað skuldi heldur latatst upp til hvønn einstakan lim at avgera, hvat hann vildi nýta.

Hetta síggja vit í grein, sum hann skrivar í Føringatíðindum nr. 2, 1897, har hann tekur undir við tí, ið "ein vestanmaður" og M. Winther hava skrivað í blaðnum frammanundan. Her sigur hann, at skal felagið avgera, hvør skriviháttur skal nýtast, má tað latast til limirnar at avgera. Skulu allir limir hava sama møguleika at greiða atkvøðu, má takast undir við uppskoti M. Winthers, um at býta Føringafelag sundur í smærri eindir, so at høgligari verður hjá bygdafólki at koma til valstaðið.

Víðari skrivar Absalon: "Eg haldi Føringafelag skuldi latið verið at avgera um stavingar-lagið, av tí simplu grund, at fjøldin av limunum hevur ikki skil á at gera tað við lít. Tað kann jú onga grund hava, at tann, ið ikki dugir Oldnordisk, skal duga við lít at døma um, kvat stavingarmátin er tann, ið gagnar okkum at brúka.

Vit kunna hava skil á, kvat okkum Føringum kvør í ser dámar best at lesa og skriva, edla kvat okkum tikir vera lættari at læra; men hetta haldi eg vit skuldi ikki lagt so mikið lag í, tí lærast má tað ið kvussu er, um tað so verður eitt sindur lættari edla tingri at læra, tað ger ikki mun; meiri eiga vit at fara ettir, kvussu Ikki-Føringum dámar skrivingarlagið, serskilt okkara Donsku ráðandi monnum.

Er tað sum Jóanes bóndi segði í síni seinasti grein (nr.19): "sum er lesa adlir ráðandi menn okkara mál uttan at hava lært tað, men verður broytt, skilja teir okkum ikki" - tá er ikki gott at forstanda, kvat tann innarsta grundin er firi broytingini.

Man tí ikki vera best at spirja okkara hægstu ráðandi menn, kvønn stavingarmátan teimum dámar betri? Til sjeyndar og seinast kemur alt ann uppá, kvat teir siga. Vilja teir ikki kennast við okkara skrivingarlag, so fær málið stuttar rásir - so kemur tað ikki til æru, - nei, so kemur tað ikki longri enn til kvønndagsbrúk okkara midlum, og tað man fadla kvørgum partinum av felagnum. - hetta mann eisini vera besti mátin at fáa semju og frið aftur í felag okkara, sum broytingin hevur skilt at." (Føringatíðindi nr. 2, 1897)

Eftir hesum at døma, er ikki so álvarsamt fyri Absaloni, í hvørjum líki málið verður nýtt, um tað er ein rættskriving, ella ein onnur. Tað mest avgerandi er, at tað verður góðkent og kann vera nýtt, ikki bert í vanligum tosi millum manna, men allastaðni, í skúla, á tingi og í kirkju. Hetta metir hann eisini vera endamál felagsins: at standa saman fyri at fáa føroyska málið aftur til heiðurs, í staðin fyri at skiljast í ósemju um stavingarlagið.

Sjálvur dugdi Absalon ikki stavseting Hammershaimbs, sum væl sæst í brøvunum, hann hevur skrivað.

Men hetta mál, sum Føringafelag hevði sett sær, var ikki so lætt at náa, sum ein kundi hugsa sær. Absalon sigur í grein síni Maalstrævet (Dimma, nr. 49, 1895) at tá hann fyrstu ferð skrivaði um føroyska málið, (í Dimmu nr. 50, 1888), kom honum ikki til hugs, at arbeiðið fyri at fáa føroyska málið aftur til heiðurs, kundi fáa mótstøðu. Men nú, fleiri ár seinni, er mótstøðan framvegis hørð. Kanska er ein orsøk, heldur hann, at hann og aðrir, ið umrøddu hetta í Dimmalætting, ikki vóru nóg varnir í orðum, og tí kanska hava fingið onkun til at føla seg sekan í tí lagnu, føroyska málinum hevði verið fyri. Hann biður so um at fáa greitt fram, hvussu støðan er viðvíkjandi málinum: "Er der noget Lovbud eller Kongebud, som forbyder brugen af det færøske Sprog indenfor Kirkens døre; Er det ikke ligeberettiget dér med det danske, lige saa vel inden for Lagtingets døre?" (Dimma nr. 49, 1895).

Hann heldur tað eisini vera ófatiligt, at nakar kann siga, at vit við at læra móðurmálið væl og aftur fáa tað til síni rættindi í skúla og kirkju, harvið steðga okkara framburði, handaliga ella andaliga. Og hann endar við hesum orðum: "Jeg kan ikke et Øjeblik faa mig til at tro dette, at nogen for alvor kan mene, at vi skulde blive ringere danske Undersaatter af den Grund, at vi stræbe efter - og kunde vinde frem til - at blive bedre færinger. Jeg smigrer mig derfor med det Haab, at Modstanden kun er tilsyneladende, og at dens Tid snart vil være forbi." (Dimma nr. 49, 1895).

Í 1900 sær heldur ljósari út, tá hann, spurdur um hann heldur tað føroyska fer at vinna fram, svarar: "Tað er ivaleyst. Eftir øllum merkjum at døma eru vit kannske ikki so langt frá málinum, sum teir flestu halda." (Fuglaframi nr. 18, 1900). Men hóast onkur glotti er, man mótstøðan mangan kennast tung. Í brævi til Mariu Mikkelsen 27. juli 1901 skrivar hann: "Forrestin er fjøldin av fólkinum heruppe en - sum ávur - dett fyri øllum felagsverkinum." Og "...vit vildo framettir - eg rojne enn ettir evnum at streva fram - men bakstrevarnir



*Absalon er jarðaður í kirkjugarðinum á Trøllanesi. Her verður Poul borin til seinasta hvíldarstaðið.*

*Hesin steinur til minnis um Absalon varð settur í kirkjugarðsveggin. Teksturin á steininum stendur í greinini.*



**Framhald á næstu síðu**

ero so sterkir, so e ok mínir mejningsfelar sleppa ike burturúr stað, men tó gengir fram, ok skal ganga fram; sokvørt sum bakstrevarnir dojgja burtur, gongir lettare - fordýra at tað grør ejnki ella líte upaftir eftir tejmen, men tað ger tað eftir ogun - jú so vitnar Mannasøgan." Og 10. Nov. 1901 skrivar hann: "...Eg føle meg so kaldan til dag(s)verki, av mótestøvene man møtir, av bakstrevarum - ok verre líkagildihojtene, sum forar fyre allare framgond..." So mangan man hava kenst tungt, av mótstøðuni, hann møtti, og ikki minst, av líkasæluni millum fólk.

Men meðan Absalon og Føringafelag strevast, føroyska málinum at frama, harðnar stríðið innan felagið, og gerst so álvarsamt, at nógvir melda seg úr felagnum orsakað av støðu felagsins í rættskrivingarmálinum. Felagið minkar, og longri verður millum fundirnar, og í 1899 er so lítið fólk á fundi, at aðalfundurin er ikki viðtøkuførur, hóast roynt var 3 ferðir.

Minkandi limatal í Føringafelag mundi vera fylgt av fækkandi haldarum av blaði felagsins, Føringatíðindum, og eftir at felagið eina tíð hevði havt hall, og innkrevjing av limagjaldi var dottin niður fyri, stóð felagnum ikki til at bjarga.

A.C.Evensen sigur í Búreisingi, (1902, s. 178) at hann einaferð bar upp á mál at upployso felagið, men tá mótmælti Absalon harðliga og segði, at felagið skuldi ikki doyggja, um hann so skuldi vera einasti limur.

Men seinasti fundurin í Føringafelag var hildin um Ólavsøkuna 1901. Absalon var sum vanligt á fundi, og tá menn flestir hildu, at felagið nú var komið á deyðastrá, mótmælti hann harðliga. Rasmus Rasmussen, ið sjálvur var á fundinum, hevur sagt frá, at eftir at tosað hevði verið um trupulleikarnar, spyr Absalon Rasmus Effersøe: " Ert tú limur í felagnum?" "Jú", svarar Rasmus, "tað haldi eg, at eg eri í felagnum." "So eru vit tveir, svarar Absalon, og so er tað eitt felag." Rasmus Effersøe mátti tá fara, hann skuldi spæla sjónleik. Tá segði Absalon illur: "Er nakað verðsins skil á tí, at fara at spæla komediu, tá ið tað stendur um, antin felagið skal liva ella doyggja." Men við hesum upployst-ist felagið, og við árslok 1901 steðgaði útgávan av



*Her standa tríggir eftirkomarar við leiðini hjá Absaloni og konuni Elini Sofíu. Í miðjuni er tað oldurabbasonurin Bárður Østerø, sum í dag hevur festið í Útistovu. Vinstrumegin stendur pápabeiggin Hans Jacob og høgrumegin pápabeiggin Jónsvein, og eru hesir tískil langabbasynir Absalons.*

Føringa-tíðindum.

Hetta var Absaloni dyggur smeitur, at teir, ið vildu málinum væl, skuldu skiljast, tí teir kundu ikki semjast um skriviháttin. Sjálvur legði hann, sum nevnt, ikki so stóran dent á, hvør skriviháttur varð nýttur, tí tað, ið um ráddi, var at fáa føroyska málið aftur á føtur, um tað var stavað so ella so.

Sjálvur hevði hann gingið og uggað seg við, at Føringafelag mundi tó ikki fara at doyggja rættiliga, tí málið er gott, og hann trýr tí, at Harrin man vita at finna onkran, sum kann reisa felagið aftur á føtur.Tí doyr felagið, so verður afturstigið so stórt, at hann fær ikki framstigið at síggja.

**Skeiðið lokið**

Sunnudag 13. juli 1902 var lýst til fólkafundar á Viðareiði, og Absalon hevði frætt, at føroysk gudstænasta fór at verða hildin í sambandi við fólkafundin. Hetta vóru gleðiboð hjá Absaloni. Hann hevði nú vón um at uppliva tað, sum hann hevði strítt fyri, men tó, eftir seinastu gongdina í Føringafelagi, hevði mist vónina um.

Soleiðis kom tó ikki at vera, tí longu fríggjakvøldið 11. juli doyði Absalon, 72 ára gamal.

Hann hevði um kvøldið sitið í liðanum millum Uppistovu og smiðjuna og etið ein turran fisk, hann hevði bukað sær.Tá kom Katrina í Uppistovu framvið, og hann spurdi hana um okkurt at bloyta við. Hon gav honum ein tálgarmola, og so át hann seg lidnan. Um kvøldið, tá hann fór til songar lá hann og tosaði við konu sína um tað, ið henda skuldi komandi sunnudag. Tá reisist hann bráðliga upp undir seg og segði, at hann føldi sær nakað fyri bringuni. So datt hann aftur á aftur - deyður.

Absalon varð grivin í kirkjugarðinum á Trøllanesi.Í minningarorði skrivar Sverre Paturson, at honum fylgdi ein so stór mannfjøld, sum ikki hevur fylgt líki fyrr á Trøllanesi. Prestur (tað mundi verða Viðareiðisprestur, Heilmann) kom sjálvkravdur, og helt eina vakra og magnfulla talu og takkaði Absaloni fyri, at hann hevði elskað Føroyar og sítt móðurmál. Hetta var óhoyrt, at prestur á grøvini veitti føroyingi tøkk fyri at hava elskað føðiland sítt og móðurmál, hóast mangur mundi hava havt tað uppiborið, skrivar Sverre.

Í Kirkjugarðinum á Trøllanesi varð minnissteinur settur við hesi innskrift:

Vinir og frændur
settu henda stein
til minnis
um

Absalon Guttormsen
á Trøllanesi

føddur 5. mei 1830 doyði
11. juli 1902
Royna alt tað besta kjósa,
sýna fólki hugsnarleið,
vísa vinum vegin ljósa,
so útrann títt æviskeið!

Steinurin varð drigin oman úr dalinum og laðaður inn í kirkjugarðin við síðuna av portrinum. Ørindið hevði Símun av Skarði yrkt.

Kona Absalons, Elin Sofía, sat einkja sløk 4 ár, til hon doyði 1. februar 1906. Hon varð jarðað á Trøllanesi.

**Ein hugsjónarmaður**

Um Absalon kann sigast at hann var ein hugsjónarmaður. Hann hevði hugsjónir, sum hann livdi og stríddi fyri.

21. mars 1902 skrivar hann í brævi til Mariu Mikkelsen: "...eg vil frameftir, en sum fir - serliga er tað, sum tigum vita, Avhaldsstreve ok malstreve, sum liggur mer upá hjarta; Upplýsing ok frýsinne líkalejðis."

Hesum sjónarmiðum, avhaldsmálinum, móðurmálinum, upplýsing og frísinni, stríddist hann fyri. Avhaldsmálið varð ivaleyst tað, hann fyrst gav seg út í sum felagsarbeiði, seinni varð tað móðurmálið og tjóðskaparrørslan. Og sum lærari, og ivaleyst áðrenn eisini, hevur hann virkað fyri upplýsing og frísinni, tá hann útvegaði bøkur, sum hann lænti fólki at lesa, ella eisini sjálvur gekk inn til fólk, at lesa fyri teimum. Um hann hava fleiri sagt at hann varð frísintur maður, sum altíð var opin fyri nýggjum hugskotum. Men sjálvsagt var Absalon ikki uttan brek. Hann var soleiðis eftir øllum at døma lítið hugaligur sum bóndi og útróðrarmaður, og hevur helst stundum verið strævin hjá hinum í lítla bygdarsamfelagnum, har samarbeiði var so neyðugt.

Ivaleyst mundi hann eisini mangan vinna lítlan samhuga millum bygdarfólkið og ikki altíð verða skiltur, sum hann ynskti. Í brævi til Mariu Mikkelsen í mars 1902 skrivar hann: "Tigum vita, at - serliga um vetrartíð, er so knípe her á Trøllanese, tað kann vera so langt ímillum tað frettist, ...so er her ejngin (fá ere folkene), sum man ret kann snakka [við], ella sum fatar tað, sum mínum hjerta liggur nest."

Týðiliga framgongur eisini, at sjálvur heldur hann seg vera frammanfyri sína tíð. Í brævi til Mariu í novembur 1901 skrivar hann: "...Tað vejt eg, at eg kom at vera so langt fyre mýna týð - eg sjilde nok helst núfirstane vere føddir.

Tað er ikki stutlit at vera forúd fýre týena - at siga fýre týena, man er her at vera - hvusse tað er fýre sejnne vejt eg ikki..."

Og seinni skrivar hann: "Mít dagsverk er snart enda (vil eg vanta), men hvat er útretta? Ja eg vejt ikki, men líte - ja líte er tó ikki ejnke, man er vel ikki berettejavur at venta størt...

Ejn trojst er tað tó, at vita se hava vere vi at arbojt í tý partenum,sum vil fra[m] til tað, got er, bæðe til Likam ok Sál... Strevin Ver hevur vere - ok líka strevin en, tý eg kan ikki halda stilt, eg vil rojna, men lítlan veg gengir - ok so fyre frýsinne Lítlan veg gengir..."

Hetta síðsta brotið haldi eg lýsir væl mannin Absalon Guttormsen, tá ein hevur lív og virki hansara í huga: at tað var honum ein troyst at vita seg hava verið í tí partinum, sum vil fram til tað, gott er, bæði til likams og sálar, hóast hann helt ov lítið síggjast eftir.

**Óli Wolles**

Skrivað sum høvuðsritgerð á HF í Hoydølum í januar 1982. Greinin er prentað við gjøllari kelduávísingum í Varðanum bd. 54, 1987.



*Tað er ikki nógv av persónligum lutum, sum liggja eftir Absalon. Størsti saknurin man vera í teimum myndum, sum hann tók, og sum ikki eru til í dag. Men eftir tilburðin, tá Absalon varð stangaður av einum tarvi, fekk hann sær ein revolvara, sum skuldi verja móti endurtøku. Hesin revolvarin er til, og er hetta mynd av honum.*

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

## *Bjargingarútgerð*

### *á sjógvi og landi*

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*

*· Bjargingarbátar*
*· Bjargingarnet*
*· Yvirlivilsisdraktir*
*· Flótidraktir*
*· Bjargingarvestar*
*· Bjargingarkransar*
*· Epirbar/neyðsendarar*
*· Radartranspondarar*
*· Eldsløkkjarar*
*· Eldávaringar*
*· Branddraktir*
*· Umvælingar*
*· Eftirlit*



**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



# Skal skipið vaskast?

**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- **Serkunnleiki innan vasking av aptering**
- **Vasking av maskinrúmi**
- **Reinsa teppi**
- **Bona gólv**
- **Reinsa koyggju og forheng**
- **Reinsa gamalt bonivoks**
- **Seyma nýggj forheng**
- **Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.**
- **Brúsubakkar "Homequeen vinyl"**
- **Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið**

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo



## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

**Sp/f Contrive Jsp Ltd.**
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**






**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

***◆◆◆vælkomin inn á gólvið***

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
**Tel. 455254 - Fax 457254**
**www.snorisvirkid.fo**

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
**Tel. 473000 - Fax 473001**
**www.teymavirkid.fo**



## MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



J. Paturssonar gøta 18

Vit klippa eftir TÍNUM høvdi



SAXOFØN
TLF. 31 68 08



## Ja takk!

**Eg ynski at gerast haldari av FF-blaðnum fyri bert 50 krónur um ársfjórðingin**

Verður sent óposteð - vit gjalda postgjald

Navn: ______________________
Bústaður: ______________________
Bygd/býur: ______________________

**FF-blaðið - postsmoga 58 - FO-110 Tórshavn**
**Tlf: 31 15 69 - Fax: 31 57 69**
**T-postur: ff-blad@post.olivant.fo**

# Hugleiðingar um Poul á Trøllanesi

## Var ein tann fyrsti við revahaldi í Føroyum



*Poul og Julia. Julia var eisini eitt skilafólk og var stak røsk til alt arbeiði. Meðan tey búðu í Klaksvík, plagdi hon at seyma á sjúkrahúsinum.*

Tann 27. apríl andaðist Poul Joensen á Trøllanesi, 94 ára gamal. Við honum er farið eitt reystmenni, sum skal fáa nøkur orð higani.

Poul var ein rættiligur partur av teirri bygdamentan, sum vit fleiri ferðir hava skrivað um her í blaðnum. Tilvildarliga kemur hendan minningargrein samstundis, sum vit endurgeva ritgerð um ein annan kendan Trøllanesmann, nevniliga Absalon Guttormsson.

Absalon doyði í 1902, og Poul var føddur í 1908, so hann og hansara systkin kunnu eins og hini nýggju ættarliðini í bygdini roknast sum eitt framhald av tí, sum Absalon stóð fyri. Her skal verða nevnt, at tann Johannes, sum var umrøddur í fyrra partinum av greinini um Absalon, var abbabeiggi Poul.

Poul var ættaður úr Innistovu, sum er eitt av teimum trimum húsunum, sum hava myndað Trøllanes í øldir. Foreldrini hjá Pouli vóru Jógvan, sum var ættaður úr Syðradali, og sum við giftuni við Marin Malenu í Innistovu festi garðin.

Tey vóru tilsamans 7 systkin, sum vóru fødd millum 1904 og 1917. Í dag livir bert Johanna Mathea Skaale, sum var næstelst eftir. Hon verður 97 ár í august, so tað kann ikki sigast annað enn, at ættin er seiglívað. Her fara vit at sníkja inn eina rætting til frásøgnina um føðingardagin hjá Símun Johan Wolles. "Ellisforsetin" her var Johanna Mathea, sum framvegis er sera skilagóð, og sum veit so nógv at siga frá. Hetta fingu okkara lesarar at sanna, tá vit høvdu samrøðu við hana, tá hon fylti 95 ár í 2001.

**Misti mammuna 13 ára gamal**

Poul var bert 13 ára gamal, tá mamman doyði. Men lukkan fyri húsið gjørdist, at mosturin Anna Sofía tók við og komu í móðurs stað. Anna Sofía var ein persónligheit og eitt konubrot, sum tað var stór virðing fyri. Hon stýrdi hesum stóra bóndahúsi fyrimyndarliga, og børnini hjá systrini fingu so gott í beinið sum nakar.

Á Trøllanesi hevur tað verið soleiðis, at tað altíð hava verið trý húsarhald. Samstundis hava verið nógv børn. Men tá børnini vuksu til, var ikki pláss fyri teimum í bygdini. Elsti sonur festi, og hini fluttu aðra staðni at búgva.

Men hetta vildi Poul ikki góðkenna uttan víðari. Hann var Trøllanesmaður, og her vildi hann búgva. Hann vildi vísa, at hetta eisini kundi bera til, sjálvt um hann ikki var borin til garðin. Hann vildi eisini skapa nýggjar vinnumøguleikar afturat bóndaskapinum.

**Revafarmur**

Sum ungur fekk Poul annars tuberklar og varð innlagdur á sanatoriinum. Her stóð so illa til, at familjan varð boðsend at síggja hann. Men hann kom fyri seg aftur. Poul segði seinni, at tað var so lítið eftir av honum, at ein sjúkrasystir kundi bera hann í kneppinum, hóast hann var stórur maður.

Poul hevði áræði og vildi skapa nýggjar vinnumøguleikar við revafarmi. Hetta gjørdist ein stór vinna í Føroyum, og Poul var ein av teimum fyrstu. Hann fór seinnapartin av 30-unum til Noregs at seta seg inn í revahald, og afturkomin bygdi hann ein stóran revagarð á Trøllanesi. Hann varð bygdur í 1936 og fyrstu revarnir fluttu inn 17. januar 1937. Íløgan í revagarðinum var kr. 1.800. Tað vóru aðrir revagarðar bygdir á Trøllanesi. Jacob Samuelsen, ættaður Lorvík, sum var beiggi Elspu konu Óla Wolles í Uppistovu, var eisini ein av teimum fyrstu í hesi vinnu. Seinni aftur bygdi Thorstein beiggi Poul revagarð.

At reka ein revgarð á einum so avbyrgdum øki sum Trøllanesi var ikki bert sum at siga tað. Eitt var fóður til revarnar. Hetta var fiskaavfall, sum ofta mátti fáast úr Klaksvík. Grind og avfall frá slakti kundi brúkast. Men fyri at skinnini skuldu gerast best møgulig, kundu revarnir ikki fáa hvat sum helst. Teir skuldu hava eina rættiliga matskrá. M.a. skuldu revarnir hava feskt hvønn dag. Her var havhestur, tað sum var nærmast. Hann kundi altíð fleygast, og tað hendi, at teir máttu sjálvan jólaaftan fara í Hvannrók at fleyga havhest til revarnar. So tað var nógv lagt fyri.

Men fóðrið máttu eisini malast, so tað kundi verða etið av djórunum. Her út-



*Her hava Trøllanesmenn verið eftir veðrum. Aftast er Poul. Uttast til vinstru er Mikkjal beiggi Poul, og uttast t.h. er Berint Wolles.*



*Her sæst Poul við rulluna umborð á "Tindi".*

vegaðu teir sær ein Solo motor at dríva kvørnina. Solo motorar vóru ikki altíð eins lættir at starta, so her var nógv vinding við tí kasti, sum skuldi nýtast til at fáa motorin í gongd. Kastið brotnaði javnan og mátti sendast til Klaksvíkar at gerast aftur.

Viðhvørt sluppu revarnir. Tá máttu fatur fáast á teimum aftur. Ofta komu teir aftur tá teir gjørdust svangir. Men komu teir ikki aftur innan 2-3 dagar, fingu teir smakk fyri frælsið og fóru út at strúka! Og onkuntíð kundi tað taka mánaðir áðrenn teir fingust aftur, og hetta merktist væl í hønsahúsunum í oynni. Revarnir kundu ferðast víða. Revur av Húsum, sum hevði verið sæddur á Syðradali, varð seinni skotin norðuri á Trøllanesi beint undir vitanum úti á Hellu.

Sum við seyðasýningum vóru eisini revasýningar, og Poul fór tá til Havnar við livandi revum, og hann fekk eisini minst ta einu heiðurslønina.

Umstøðurnar broyttust tá kríggið kom. Marknaðurin fyri rev var Bretland, og sum kríggið leið vóru minni og minni ráð at nýta pening til slíkt luksus sum pelsar til konufólk. At enda varð tollur lagdur á, so lítið var eftir. Søgur siga, at summir revaalarar royndu seg við smugling av revaskinnum við fiskiskipum, sum fóru niður at landa, men hetta kom skjótt at steðgað av sær sjálvum. Prísurin á revaskinnum fór frá kr. 500 og onkuntíð kr. 800 niður í kr. 100. Men hóast hetta royndi Poul at treiskast, og seinasti revurin varð ikki avtikin fyrr enn 17. januar 54, ella dagsett 17 ár eftir at fyrsti revur varð settur við.



*Her síggjast revagarðarnir hjá Pouli og hjá Jacobi Samuelsen. Poul eigur tann syðra og størra garðin.*

**Bygdi hús á heimstaðnum**

Poul giftist í 1943 við Juliu, ættað av Húsum. Og hann meinti tað, at hann vildi vera verandi á Trøllanesi, so tey bæði bygdu hús á Trøllanesi, sum tískil gjørdist 4. húsið í bygdini. Tey fingu fýra børn. Marita, sum er gift niðri, Eyðun sum býr í Klaksvík og Jóngerð og Steinvør, sum búgva í Havn.

Tá revarnir duttu niður fyri, kom Poul at røkja sjógvin. Tá gjørdist tað nakað óhøgligt at búgva á Trøllanesi, so tey fluttu til Klaksvíkar í 1961. Poul hevði skiparaprógv, og var hann m.a. skipari á "Barsskor", sum nú í nógv ár hevur røkt rutuna til Kalsoynna, men tá Poul var við, var tað til fiskiskap.

Her kann eisini verða nevnt, at Poul var skipari á "Øker", tá hann undir krígnum varð ásigldur av "Polo". "Øker" fór at søkka. Allir fýra menninir sluppu upp í vevlínurnar og bjargaðir av kempuni Poul Meyer Olsen úr Svínoy, sum fleiri ferðir er umrøddur her í blaðnum fyri síni bjargingarbrøgd. Poul "gággaði" í menninar og fekk teir umborð á "Polo".

**Við "Tindi" ex. Louisu**

Men høvuðsvirkið hjá Poul á sjónum gjørdist við "Tindi", sum hevur verið umrøddur her í blaðnum, sum tann triðja "Louisa" hjá Christian í Dali. Báturin var bygdir í 1925 av Eliasi í Rættará. Hann varð seinni av Loðsinum seldur til Vágs og síðan til Trøllanesar, har Poul var ein av eigarunum. Men tað var so róð út frá Klaksvík. Teir høvdu bátin frá 1958 til 1974.

Her fekk Poul besta ummæli. Teir fingu heiðursmerki frá landsstýrinum fyri framúrskarandi røkisskap, og í stovuni hjá Pouli hongur eisini heiðursbræv frá Klaksvíkar Útróðrarfelag.

Men longsulin eftir Trøllanesi hevur verið stórur. Tá koyrandi varð í 1986, fluttu tey bæði norður aftur. Nú skuldu tey njóta teirra aldurdóm á Trøllanesi. Tey høvdu eisini 10 góð ár har norðuri. Men Julia gjørdist minnisveik og kom rættiliga skjótt á røktarheim, og hon doyði fyri nøkrum árum síðani.

Hetta var tungt hjá Pouli. Hann var um Juliu so nógv hann kundi, samstundis sum hann búði á Trøllanesi, har hann aftur kundi luttaka í bygdalívinum. Hann fleygaði fram við bakkanum heilt til hann var 91 ára gamal.

Hóast tað var nakað einsligt at vera einsamallur í húsi, so vóru øll bygdafólkini um hann og vóru góð við hann. Einaferð kundu vit her í blaðnum greiða frá, at hann hevði fingið ein forkunnugan gest. Hetta var ein kvørkveggja. Hon fann útav, at hvørja ferð hon kom inn á gólvið hjá Pouli, fekk hon molar, so kvørkveggjan gjørdist fastur gestur. Hetta sigur nakað um, hvussu ein kann liva saman við náttúruni í einum slíkum plássi.

Poul var eina skilamaður, sum tað altíð var hugaligt at práta við. Hann visti nógv sum ofta við fólki á slíkum plássum. Sáttligur og hóvligur var hann.

Hetta skoðsmál fær hann eisini frá sínum bygdamonnum. Símun Johan, sum er eini 25 ár yngri enn Poul, fortelur, at Poul var rættiligt sambindingarlið millum ættarliðini. Tá børnini høvdu brúk fyri onkrum at spæla, so var Poul altíð til reiðar. Og var brúk fyri honum til meira vaksnamannauppgávur, tá var Poul eisini tøkur.

Hann vann sær eisini nógvar vinir, og hetta sást ikki minst henda fagnardagin, Poul fór til gravar, og hann koma at liggja undir liðini á Juliu í kirkjugarðinum á Trøllanesi. Seinasta árið var hann á røktarheiminum á Klaksvík. Men tað, sum lá honum mest á hjarta, var at sleppa norður aftur til Trøllanes. Og hetta ynski hevur hann fingið uppfylt, og nú er tað med alla.

Ærað veri minnið um Poul á Nesi.

*ó.*



*Hetta eru tey fjórðu húsini á Trøllanesi. Poul bygdi tey í 1943. Her støðgar hann seinastu ferð uttanfyri hjá sær sjálvum.*

we make fishing more profitable



Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:
■ Rækjutrol ■ Botntrol ■ Flótitrol ■ Semipelagisk trol

Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:
■ Lodnu ■ Makrel ■ Sild

Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:
• Vaska og impregnera nótir
• Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna

VÓNIN LTD.

Høvuðsskrivstova:
Vónin P/F
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
www.vonin.com

Tórshavn:
Áłaker
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

Miðvágur:
Telefon 33 29 46

# Fiskivinnuframsýningin

**Tað hevur longu verið so nógv skrivað í fjølmiðlunum um fiskivinnuframsýningina inni í Runavík seinasta mánaðaskifti. Vit vóru sjálvsagt á messuni, har vit hittu nógvar fiskimenn, sum við áhuga hugdu at øllum tí, sum her kundi síggjast. Og tað var ikki smávegis. Heilt frá sjómansmissión til tosandi skiljimaskinur.**

**Vit hava eina myndafrásøgn, har dentur kanska verður lagdur á framsýningina út frá tí, sum hevur serligan áhuga fyri fiskimenn. Men tað skal sigast, at her var so nógv, at tað er bert ein lítil partur, sum kann verða tikin við.**



*Í frásøgnini frá Hirtshals hittu vit Gullak Madsen. Hann var sjálvsagt eisini á framsýningini saman við skiparanum á "Ruth" Mikkjal Godtfred.*



*Torleif Johannesen og hansara Sjómansmissión høvdu ikki nakað beinleiðis at selja. Men øll vita, at Torleif hevur eitt brennandi hjarta fyri fiskimonnum uttan at hugsa um egnan vinning. Tí rokna fiski- og sjómenn hann eisini at vera teirra mann. Her er hann saman við fiskimonnum.*




*Torleif her saman við Jón Rasmussen, skipari á "Christian í Grótinum".*

*Í básinum hjá Runavík sást hetta modellið av eini slupp. Tað serliga við henni er, at her sæst, hvussu ein slupp sá út innan við lugari, last og kahútt. Tað er ikki minst hugtakandi fyri ein gamlan sluppfiskimann at síggja lugarið, sum sær nágreiniliga út, sum tað var tá. Her kundu vanliga búgva 10-14 mans. Í lugarinum varð matgjørt og her var etið. Og her helt fólkið til, tá friður var. Maturin varð gjørdur á einum kolkomfýri. Og stuttligt er, at sjálvt kolkjallarin er komin við. Tá Óli Jacobsen fór til skips við slupp í 1958 sum 14 ára gamal, var tað uppgávan hjá teimum ungu at fáa kolið úr kolkjallaranum uppí ein kolbonk, hagani kokkurin kundi halda eldin viðlíka.*

*Sluppin er gjørd av næmingum í Runavíkar Skúla fyri uml. 20 árum síðani. Hetta var úrslitið av eini verkætlan, sum lærarin Bynne Lamhauge stóð fyri. Bynne sigur, at hetta var ein spennandi uppgáva, sum eisini vakti nógvan ans. Til hjálpar høvdu teir gamlar fiskimenn á leiðini, sum áhugaðir fylgdu við, hvussu tað gekk, og teir kundu tryggja, at sluppin veruliga samsvaraði við veruleikan.*







*Hetta er ein rættiligur fundur millum fiskimenn og partvíst fyrrverandi løgtingsmenn. Frá vinstru er tað Karl Robert Johansen, sum bæði hevur verið fakfelagsmaður og tingmaður, Richard Klakkstein, Lasse Klein, sum sigldi við Stapanum í fleiri ár og Andor Isaksen, sum er gamal trolaramaður hjá Kjølbro. Lassi er nú farin uppá land og umboðaði á stevnuni AWI boats, sum serliga hevur bygt bátar til Grønlands. Hann letur hampiliga at.*



*Ein av framsýnarunum er Jógvan Weihe, t.h., sum selir alla møguliga skipsútgerð. Jógvan er gamal fiskimaður. M.a. var hann kokkadrongur við "Vesturhavinum Blíða" á fyrsta túrinum í 1957, sum vit greiddu frá her í blaðnum fyrst í árinum.*




*Fleiri av donsku fiskivinnubýunum í Danmark vóru eisini umboðaðir, og ein teirra umboðaði Skagen. Til vinstru er umboðið fyri Skagen Havn, og t.h. er tað stjórin á skiparaskúlanum í Skagen Jørgen Jensen, sum hevur havt nógvar næmingar – bæði føroyskar og grønlendskar.*

*Millum Óla Jacobsen og Jørgen Jensen er ein serligur kennskapur. Fyri 40 árum síðani var Óli á Fiskaríháskúla í Middelfart saman við Slej Venø, sum var svágur Jørgen. Slej druknaði sum 22 ára gamal, og síðani tá hevur verið samband teirra millum. Jørgen og Óli hava tískil kenst í nærum 40 ár, og Jørgen kann fortelja sínum føroysku næmingum, at tað er í hvussu er ein føroyingur, sum teir kenna í felag.*



*Frank og Annelin umboða "Trygd á arbeiðsplássinum," og er hetta klæði, har trygdin stendur í hásæti. Frank er innarlaga í føroyskum politikki. Hann er nevniliga húsavørður hjá løgtinginum. Hesin parturin av virkseminum virkar í hvussu er sum hann skal!*



*Bátafelagið á Bakka var eisini umboðað og sýndi fram hendan gamla føroyska bátin, sum jú er ein partur av grundarlagnum fyri teirri menning, sum kundi síggjast á framsýningini. Frá vinstru síggja vit Charles Jacobsen, sum er formaður í Bátafelagnum, Maria Jacobsen, Jón Eliasen og Klæmint Jacobsen.*




*Ein kendur skipari er gøtumaðurin Arne Hansen, sum er skipari á "Tróndi í Gøtu". Sum kunnugt hava gøtumenn bílagt eitt nýtt nótaskip, og her er Arne avmyndaður saman við tekningum og myndum av "Finni Fríða", sum nýggja skipið skal eita. Tað var annars tann gamli "Finnur Fríði", ið varð bygdur sum línuskip fyrst í 60-unum, og sum fekk kraftblokk mitt í 60-unum, sum var grundarlagið fyri nótaævintýrið í Gøtu.*




*Ein av teimum mest spennandi nýggjheitunum á framsýningini var tann "tosandi" skiljimaskinan. Tað, sum var rættiliga ein nýhugsanin, er, at maskinan kann, umframt at skilja støddir, eisini skilja fiskasløg frá hvørjum øðrum. Tað kann skiljast í 60 sløg/støddir, umframt at maskinan fyri hvønn fisk munnliga boðar frá slagnum. Tað er tó heilt ótrúligt! Ein slík maskina kann kollvelta skiljiarbeiðið á landi, men kann ætlandi eisini brúkast umborð á t.d. verksmiðjuskipum, tá veiðan ofta er samfingin. Hetta er mynd av maskinuni saman við tveimum av monnonum aftanfyri hana. Til vinstru er tað tann bert 28 ára gamli Páll Fagradal, sum er verkfrøðingur, og sum kanska kann sigast at umboða tað teoretiska í verkætlani. Afturat honum hevur datamatikarin Thomas Hansen verið við í hesum partinum av verkætlanini. T.h. er tað Petur J. Petersen av Saltnesi, vanliga kallaður Dakko, sum er fyrrverandi fiskimaður. Sagt verður um Dakko, at hann er tann "praktiske gris" í verkætlanini. Hann er tann praktiski maðurin, sum kann fáa alt tøkniligt at rigga uttan mun til, hvat tað er. Her er tískil talan um eitt gott dømi um, at "teori" og "praksis" ganga hond í hond, og at nakað tá kann spyrjast burturúr. Men tað hugaliga er eisini, at við eini slíkari verkætlan er prógvað, at føroyingar als ikki smæða seg burtur.*



*Felagsmenn fingu eisini høvi til at stinga høvdini saman. Her er tað Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelagi og Petur Bjarnason, stjóri í Fiskifelag Íslands, sum er eitt meginfelag av arbeiðsgevara- og arbeiðstakarafeløgum bæði á sjógvi og landi. Okkurt er at práta um. Petur hevði eisini orðið á formanninum Fiskimannafelagnum.*



*Billy Hansen, sum sjálvur er gamal sjómaður, hevur verið undangongumaður at útvega sjómonnum bíligari telefonsamband, sum tað so sanniliga eisini er tørvur á. Her umboðar hann Tele Service.*

# Ársfrágreiðing hjá Sinnisbata

**Tann 3.mai hevði Sinnisbati aðalfund. Eins og vit hava gjørt áður, fara vit at endurgeva ársfrágreiðingina hjá formanninum Svenning av Lofti.**

Á aðalfundinum í 2002, gjørdist lítil broyting í nevndini. Nevndarlimirnir Tummas Thomasen og Arnfinn Poulsen, ið stóðu fyri vali, vóru afturvaldir. Lógin varð broytt soleiðis, at nú eru tríggir eykalimir.

Nevndin skipaði seg soleiðis eftir aðalfundin 2002:

Svenning av Lofti, *formaður,* Margretha Poulsen, *næstformaður,* Arnfinnur Poulsen, *kassameistari,* Tummas Thomasen, *skrivari,* Ásla Svensson, *nevndarlimur,* Maria Andersen, *eykalimur,* Sólbjørg Petersen, *eykalimur,* Soffi Egholm, *eykalimur.*

Frá 3. mai 2003 er nevndin hendan:

Svenning av Lofti, *formaður,* Soffi Egholm, *næstformaður,* Margretha Poulsen, *varanæstformaður,* Arnfinnur Poulsen, *kassameistari,* Tummas Thomasen, *skrivari.*

*Eykalimir:* Guðri í Bartalsstovu, Dagunn Olsen og Asta Vágadal Joensen

Umframt teir føstu nevndarfundirnar einaferð um mánaðin, hava verið nógvar eyka nevndarfundir í hesum farna ári. Vanligt er hjá okkum at eykalimirnir eisini møta til nevdarfundir. Hetta hevur verið sera gagnligt og gevandi fyri nevndararbeiði.

**Skrivstovan**

Fitt av arbeiði er at halda skil á skrivum, tíðarritum og skjølum, ið koma til Sinnisbata. Heldur ikki so lítið brævaskifti við myndugleikarnar. Anna Absalonsen er framvegis skrivstovuhjálp hjá Sinnisbata. Hetta hevur verið okkum mikil hjálp og lættir mikið um hjá nevndini – og ikki minst hjá formanninum í samband við fráboðan og skipan av nevndarfundum. Vit takka Annu hjartaliga fyri eina hjálpandi hond.

**Limafundir**

Vit hava eisini havt nakrar almennar fundir í farna árið, við viðkomandi og áhugaverdum evnum fyri psykisk sjúk, avvarðandi, starvfólk á psykiatriskum deildum og onnur sum hava áhuga í hesum arbeiði. Hesir fundir eru ein munagóður partur av okkara virki fyri at náa út til fólk.

**Hjálp frá limum, ið ikki eru í nevndini**

Vit kundu annars hugsa okkum, at havt fleiri tiltøk fyri tey sinnislíðandi, men vit sum í nevndini eru, hava ikki orku til nógv meiri enn tað, ið vit royna at gera, umframt nevndararbeiði. Men tað er kanska onkur av tykkum, sum kundi hugsað sær at hjálpt okkum á hesum øki, so eru tit meiri enn vælkomin. Tað ber væl til at gera eitt arbeiði fyri Sinnisbata uttan at vera í nevndini.

**Stuðulsfelag**

Í seinastu formansfrágreiðing var nevnt, at eitt stuðulsfelag hevði verið sera kærkomið, ið kundi fyrireikað t.d. køkusølu í SMS, miðbýnum ella aðrastaðni kring landi. Fari tí at endurtaka spurningin frá ífjør Er ikki onkur her í dag sum vil taka stig til eitt slíkt stuðulsfelag ella stuðulsnevnd undir Sinnisbata?

Nevndin hevur eisini havt frammi á fundum um at heita á limir kring Føroyar um at stovna Sinnisbata-deildir í Eysturoy, Norðoyggjum, Sandoynni, Vágoynni og í Suðuroynni. Neyðugt er, at fólk á hesum ymsu støðunum eru fús at fara í gongd.

**Steingjan av psykiatriskum deildum**

Hetta hevur verið ein søga sum hevur endurtikið seg í fleiri ár, vegna sparingar. Men hóast vit hava mótmælt hesi steingjan, so verður hetta kortini framvegis gjørt – eisini seinasta ár hava deildir verið og verða stongdar. Psykiatriska økið er frammanundan illa fyri, og ístaðin fyri sparingar á hesum økið, átti pengajáttanin heldur at verið økt, tí tilboðini til psykisk sjúk eru ógviliga avmarkað, t.d. átti ein reglulig samtaluterapi at staðið øllum sjúklingum í boði, sum er rættiliga vanligt í grannalondum. Psyk. deildir á landssjúkrahúsinum tørva stórar ábøtur.

Frá álítandi keldum á psykiatriska deplinum frættist, at ongin deild verður stong í ár. Hetta fegnast Sinnisbati um. Stríðið hevur ikki verið til fánýtis.

**Bústovnar og sambýli fyri psykisk sjúk**

Frá 1. februar 2001 kom Eysturstræti undir leiðsluna á bústovninum á Sólteigi 11. Í fjør varð seinasta hond lagt á eina bygnaðarbroyting í samband við Sólteig 11 og Eysturstræti 4, sum bar við sær at eitt nýtt felag varð stovnað sum eigur hesi bæði húsini. Íbúðargrunnurin, sum hevði lógfrøðisliga ognarrættin til Sólteig 11 avreiddi sín part til nýggja felagið og somuleiðis avreiddi Sinnisbati húsini Eysturstræti 4 inn í eitt nýtt felag, sum ber í sær at Sinnisbati eigur meirilutan í nýggja húsafelagnum og meirilutan stjórnarlimunum og í veruleikanum ognarrættin til bæði húsini.

Vit gleðast yvir og takka teimum, ið stríðast fyri at

fáa psykisk sjúkum nakað at búgva í, t.d. vistarheiminum á Fugloyarvegi og Tórfinsgøtu í Havn. Vistarheimið við Toftavatn er nú selt og verður ikki nýtt til sálarsjúk av tí at tað er yvirtikið av Runavíkar kommunu til eldrabýli. Húsið á Bóndaheyggi, ið verður umsitin av psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum, somuleiðis húsið suðuri í Vági, ið nevnist "vardar íbúðir," og sum hýsir sinnisliga sjúkum, men sum tørvar at fleiri fólk vera sett har, t.d. at arbeiða um náttina.

**Mong hava ongar bústaðarmøguleikar**

Tey eru ikki so fá, sum hava tilhald og liva sítt lív á einari psykiatriskari deild, men sum saktans kundu búð í íbúð við nakað av hjálp ella summi á einum vardum íbúðarstovni. Men hesi hava ongar møguleika at flyta út av deildini, av tí at tey einki hava at fara til. Júst hesi viðurskifti hava verið nógv umrødd seinastu tíðina og Sinnisbati hevur áhaldandi funnist at landsmyndugleikunum fyri atgerðarloysi at hesum øki – hóast lyfti um ábøtur og loysnir.

**Undir ein landsstýrismann**

Umsitingarliga hava tey sálarsjúku verið undir tveimum ymiskum landsstýrismonnum. Men avgerð er í seinastuni tikin um at Bill Justinussen, landsstýrismaður í framtíðini skal umsita alt tað psykiatriska økið, t.v.s. bæði sjúkrahúspsykiatriina, sosialpsykiatriina og økispsykiatriina. Hetta skuldi gjørt alt nógv greiðari – og betri fyri tey sálarsjúku, avvarðandi og starvsfólk á økinum.

**Ikki "kann" men "skal"**

Grein 32 í forsorgarlógin sigur at "tað almenna KANN seta á stovn ella góðkenna serligar stovnar fyri fólk við serligum tørvi. Hetta merkir tíverri ikki at landsstýrið SKAL gera hetta. Hetta merkir fyri tann einstaka, at tey ikki kunnu rokna við at fáa eitt tilboð, tá tey hava brúk fyri tí.

**Úr álitinum "Ein glotti fyri framman"**

Fyri tveimum árum síðani kom út álitið "ein glotti fyri framman", sum m.a. Sinnisbati var við at skriva, saman við øðrum, fyri at lýsa tørv teirra sálarsjúku. Her skal verða tikið eitt brot:

"Og hvør hevur so ábyrgdina av, at støðan er so trupul fyri tey mongu sálarliga sjúku, sum hava tilboð fyri neyðini. Støðan hevur verið ring í mong ár, men tey seinastu árini hevur trýstið á sjúkrahúsið og almannaskipanina verið serliga stórt.

Tað er ikki so undarligt, at trýstið er økt, tá hugsað verður um, at so lítið er gjørt fyri at útvega fleiri pláss uttanfyri sjúkrahúsverkið.

Tíverri hava myndugleikarnir ikki raðfest stovnan av bú- og arbeiðstilboðum til sálarsjúk fólk, hóast alla tíðina hevur verið gjørt vart við stóra tørvin á fleiri tilboðum til hendan bólkin.

Niðurstøðan í álitinum uppá spurningin um hvør hevur ábyrgdina av bútilboðum og arbeiðs og uppvenjingartilboðum til sálarliga sjúk fólk í Føroyum, má út frá omanfyri standandi vera, at tað almenna hevur skyldu at hjálpa einum og hvørjum, sum ikki klárar seg og síni, við tí neyðuga til lívsins uppihald.Tað almenna kann eisini gjalda útreiðslur í sambandi við eisini gjalda útreiðslur í samband við sjúku og annað.

Tað almenna hevur ikki skyldu at veita búpláss ella arbeiðspláss til ávísar borgarar, hóast teir hava tørv á hesum.

Tí er tað einasta, sum tann, sum hevur tørv á bútilboði og/ella arbeiðstilboði, og hansara avvarðandi kunnu seta áliti sítt á, tann vilji, sum almenni myndugleikin til eina og hvørja tíð hevur at játta ta neyðugu fíggjarorkuna til bú- og arbeiðstilboð til sálarliga sjúk fólk."

Sinnisbati heldur, at tað eigur at koma inn í lógina, at tað almenna hevur skyldu at útvega nevndu búpláss og at á øllum almennum arbeiðsplássum skulu verða størv tøk til sinnislíðandi og onnur brekað.

**Húsaviðurskiftini á psykiatrisku deildunum og pensionatinum**

Sinnisbati heldur eisini at ein miðvís ætlan um umvæling/endurnýggjan/umbygging av psykiatrisku deildunum má raðfestast frammalaga. Hvør sjúklingur sítt kamar.

Dygdargeran og faklig supervisión av psykiatriska starvsfólkinum.

Ein framhaldandi dygdargeran av starvsfólkunum, ið arbeiðir í psykiatriini, er sera neyðugt. Hesi fólk hava fyri neyðini at sleppa at halda dagføra seg og at fyribyrgja at tey ikki verða útbrend í arbeiðinum. At slíkt hevur stóran týdning fyri dygdina í viðgerðini av teim sálarsjúku, er eyðsæð.

**Tvørfakligt samstarv**

Innan psykiatrisku viðgerðina er neyðugt við góðum og tvørfakligum samstarvi, soleiðis at allir fakbólkar, ið hava førleika at menna og betra støðu teirra sinnislíðandi, kunnu vera ein partur av heilsubótarviðgerðini.

**Samskipari til avvarðandi**

Tá ið onkur verður innlagdur á psykiatriskari deild, tørvar at bæði tann sjúki og tey avvarðandi fáa allar upplýsingar um støðuna. Neyðugt er tí, at tað er onkur, sum hevur um hendi beinanvegin at upplýsa tann sjúka og næstarafólkini um støðuna, og eisini framhaldandi og við stuttum millumbili seta seg í samband við tey avvarðandi. Tí er neyðugt at hava ein samskipara millum sjúkrahúsið og næstarafólkini. Hesin samskiparin skal so eisini upplýsa tann sjúka og næstarafólkini um t.d. viðgerðarmøguleikar, fíggjarligar- og aðrar stuðulsmøguleikar.Við øðrum orðum tala sak teirra innløgdu og teirra avvaraðandi.

**Psykoterapeutisk fakbólkur**

Sinnisbati sær fram ímóti at eitt psykotereapeutiskur bólkur av fakfólki verður settur og sum kann virka sum psykiatrisk fyrstahjálp. Hesin bólkurin eigur at verða settur á stovn skjótast gjørligt. Hóskandi hevði helst verið at hesin psykoterapeutiski bólkurin tilhald hevði høli í einum komandi virknisshúsi, har hjálpartelefonin eisini varð sett upp.

**Sinnisjúkralógin**

Ein nýggja sinnisjúkralóg eigur at setast í gildi í Føroyum, soleiðis at sjálvsøgd rættindi sjúklinganna verða lógartryggjað. Í grannalondum okkara er oftani kjak um rættindi og viðurskiftini sjúklinganna, soleiðis at eingin viðgerð verður givin ímóti vilja teirra. Lógin, sum vit hava her í Føroyum er frá 1938, við onkrum broytingum. Hetta er sama lógin, sum var galdandi í Danmark til 1990. Men tá varð hon broytt, tí ikki varð hildið at hon ikki tryggjaði rættindi teirra sálarliga sjúku nóg væl. Hon er síðani eisini broytt nakað til bata fyri sjúklingarnar. Talan hevur verið um at hon eisini skal koma í gildi fyri Føroyar, men enn er hetta ikki hent. Sinnisbati sent landsstýrismanninum í heilsumálum uppskot um broytingar í gomlu lógini og ynskir at nýggju broytingarnar í lógini verða settar í gildi skjótast gjørligt.

**Norðurlendskar summarlegur**

Aftur í fjør vóru fleiri sálarsjúk fólk úr Føroyum á norðurlendskari summarlegu, hesuferð í Danmark, sum Sinnisbati og norðurlendsku systurfeløgini hjá Sinnisbata hava skipað fyri nú í nøkur ár. Fyri tey, sum á henda hátt, fingu høvið at koma saman við øðrum norðurlendingum, kann hetta vera ein hending fyri lívið. Sinnisbati stuðlar hesum tiltaki fíggjarliga og skipar fyri ferðini.

**Norðurlendskt samarbeiði**

Sinnisbati er framvegis nevndarlimur í norðurlendska meginfelagnum fyri psykisk sjúk og eru har nakrir fundir um árið. Umboð okkara hava verið Margretha Poulsen og Ásla Svensson. Maria Andersen var tiltakslimur har. Men persónsbroytingar verða í umboðanini framyvir, av tí at Maria og Ásla ikki eru í nevndini longur.

**Verkstaður**

Eitt av fremstu hjartamálum Sinnisbata er at fáa eitt verkstað ella virknishús. Hesin tørvur er almikil. Í samband við útkomnu álitini "Ein glotti fyri framman" og Heildarpsykiatri í Føroyum" , so er júst hetta eitt av hjartamálunum í álitunum, at fáa myndugleikarnar at fremja júst hetta. Í álitinum verður tað nevnt fyri "aktivitetshús." Endamálið er at geva sálarsjúku fólkunum ein innihaldsríkan gerandisdag, tí einki at hava at gera, arbeiði ella ítriv, er oyðandi fyri likam og sál,

**Psykiatriskur samskipari**

Eitt av hjartamálum Sinnisbata var at fáa sett ein samskipara burturav við fullari arbeiðstíð at taka sær av psykiatriska økinum. Tí var tað einki minni enn ein stórhending fyri Sinnisbata, at samskipari varð settur á serforsorgini, sum burturav fer at taka sær av sosialpsykiatriini, sum ongan góðan hevði havt higartil í landsins umsitingi. Tað var eisini eitt ynski í álitunum, at tann persónur, ið settur verður, skal hava royndir og innlit í psykiatriska øki.

**Uppsagnirnar á serstovnadeildini**

Flestu av tykkum munnu hava fylgt við tí, sum er farið fram í samband við uppsagnirnar á serstovnadeildini. Trý fólk søgdu seg ísenn úr starvi í ár: Leiðarin av Heimarøktini, leiðarin á serstovnadeildini og samskiparin fyri psykiatriska økið, Hilda Viderø, sum var sett 1. juni í fjør. Allar uppsagnirnar vóru eitt afturstig fyri okkara fólk, men serstakliga var uppsøgnin hjá Hildu Viderø eitt vónbrot fyri Sinnisbata og øll innan psykiatriska økið. Sum skilst kom hon ongantíð rættiliga í gongd við sítt arbeiði, sum millum annað var at útvega bú- og virknistilboð til sálarsjúk. Sinnisbati gjørt vart við tað sera óhepna í hesum uppsøgnum og heitti á løgmann um at kanna orsøkirnar til hesar uppsagnir, sum gjørdu at sosialpsykiatriin varð bumbað fleiri ár aftur í tíðina. Enn er nýggjur samskipari ikki settur, so hetta er ein sorgarleikur fyri okkara sálarsjúku. Vónandi verður hesin sett skjótt.

**Ætlaða almenna byggingin av íbúðarbygnini til sálarsjúk í Havn steðgað**

Saman við øðrum var formaðurin í Sinnisbata limur í einari nevnd, ið landsstýrismaðurin á økinum hevði biðið koma við einum trilmæli um bygging av einum íbúðarbygnini til sálarsjúk í Havn.

Nevndin handaði landsstýrismanninum í almannamálum lidna uppskotið í juli í fjør við eini tíðarætlan um nær húsið kundi verða liðugt at taka í nýtslu. Grundøkið var útvegað uppi við veggirnar Heygsvegur/Eystan heyg.

Men nevndin hevur enn ikki hoyrt aftur frá landsstýrismanninum og ongin bygging er farin í gongd enn og eingin veit heldur um nakra ítøkiliga ætlan hesum viðvíkjandi. Uppá persónliga fyrispurning frá formanninum í Sinnisbata, um hví byggingin ikki fór í gongd, segði landsstýrismaðurin at byggingin fór at verða ov kostnaðarmikil. Hetta undrar okkum í Sinnisbata, tí samstundis eru umleið 50 milliónir nýttar til umvælingar av gamla telefonverksbygninginum til skrivstovur til okkara tingmanning, ein bygning, sum enn stendur í hálvum gekki.Til hetta trýtur ikki peningur, men tá tað ræður um at fáa sálarsjúku medborgarum okkara mansømilig kor og sjálvsagdan mannarætt til egnan bústað – tá hevur tað almenna Føroyar ikki ráð – tá er eingin peningur.

Tó – ársins seinasta dag í 2002 keypti tað almenna eini hús í Sandavági til at hýsa sálarsjúku – hetta gleðast vit um – men vilja samstundis siga, at okkara ynski er ikki keypt hús, men hús, sum eru bygd til endamálið.

Sinnisbati vil tó siga, at í seinastuni hava vit frá teimum, ið umsita okkara málsøki, kent eina betri fatan av viðurskiftum teirra sálarsjúku ein størri vilja at fremja mungóðar ábøtur í framtíðini.

**Útferðir við sálarsjúkum**

Sinnisbati hevur roynt at skipað fyri útferðum fyri sálarsjúk á hvørjum ári. Í fjør varð skipað fyri eini væleydnaðari ferð til Tjørnuvíkar.Ælanina er eisini at gera útferðir í ár.

**Fleiri limir**

Á aðalfundinum 2001 setti nevndin sær fyri at limatalið skal verða komið upp á 400 áðrenn árið er úti. Hetta er eydnast. 24. Mai í fjør fylti Sinnisbati 20 ár og setti felagið sær fyri at limatalið 20-ára dagin skal vera komið upp á 500. Hetta mál er rokkið, soleiðis at limatalið er komið upp á 520, t.v.s. er økt við meiri enn 100 limum seinastu tvey árini.Vit heita á allar limir felagsins um at gera sítt til at felagið hevur 600 limir til aðalfundin í 2004. Um hvør tykkara, sum er her í dag fær 5 fólk at gerast nýggir limir í ár, verður hetta málið nátt.

**Tøkk og góðynski**

Vegna nevndina fari eg at takk fyri álit, ið okkum er víst st stjórna felagnum. Samstundis fari eg at takka tykkum øllum, ið gera eitt gott verk fyri okkara sálarsjúku medborgarar, bæði tykkum, sum arbeiða á psykiatriska mideplinum á landssjúkrahúsinum, tykkum sum arbeiða í heimarøktini, tykkum sum arbeiða á sambýlum og tykkum mongu, sum hjálpa til at linna tilveru teirra sálarsjúku við vitjanum á deildum, og heima, einum góðum orði og einum herðaklappi til teirra, ið mangan kenna seg forfjónaði í samfelagsins dansi um gullkálvin.

Harrin signi tykkum øll og gevi tykkum sína kraft at lætta um byrðar teirra sálarsjúku. Hann skal ikki gloyma verk tykkara, tí Jesus segði sjálvur:

"Tað, sum tit hava gjørt ímóti einum av hinum minstu brøðrum mínum, hava tit gjørt móti mær."

*(Matt. 25,40)*

Eisini hugsa vit um hetta rannsakandi skriftorði:

"Berið byrðar hvør annars, og uppfyllið soleiðis lóg Kristusar".

*(Gal. 5,2)*



*Hetta er gamla torvkubbaverksmiðjan. Talan er um eina stóra fyritøku.*

# Torvskurður og framleiðsla í Kaas

Á leiðini kring Blokhus, hagar tað ber til at fara pakkatúr við "Norrönu", er nógv áhugavert at síggja. Hetta er nakað heilt annað enn Keypmannahavn, sum nógv okkara meta sum ímynd av Danmark.

Á Blokhus-leiðini ber t.d. til at kunna seg um torvskurð, sum hann hevur verið í Danmark. Hetta sæst sjón fyri søgn í býnum Kaas, sum er einar 10 kilometrar frá Blokhus.

Her standa toftirnar av eini verksmiðju, sum framleiddi torvkubbar. Hetta lá væl fyri, tí nógvir torvheiðar vóru og eru á hesum leiðum. Fyri at fáa mest burturúr var neyðugt at finna ein framleiðsluhátt, sum kundi turka torvið og pressa tað saman til kubbar, sum lættliga kundi kykast við.

Í 1925 varð tískil reist heimsins fyrsta torvkubbaverksmiðja. Hon hevði nógvar trupulleikar í fyrsta umfari, men í 1929 varð funnin fram til ein nýggjan framleiðsluhátt, sum vísti seg at bera til. Men tá var verksmiðjan so útarmað, at hon fór á húsagang.

Tá kom staturin uppí og setti nógvan pening í fyri at fáa framleiðsluna í gongd aftur. Hetta kostaði statinum nærum kr. 700.000 og var hetta ikki smápengar tá í tíðini.

Tá kom eisini gongd í, og í 30-unum gekk so væl, at tað komu fólk úr øllum heiminum at kanna framleiðsluhættirnar.

Annar heimsbardagi merkti gyltar dagar fyri verksmiðjuna. Meðan tað frammanundan var neyðugt at kappast við týskt brúnkol, vóru teir nú einsamallir á marknaðinum, og merkti hetta eisini vinning og yvirskot.

Í 1947 fór staturin burturúr. Orsøkin hjá statinum at fara inn í verkætlanina var annars, at her kundu skapast nógv arbeiðspláss. Undir øðrum heimsbardaga vóru tað upp til 600 fólk úr øllum Danmark, sum arbeiddi her, og vóru tað bæði kvinnur og menn.

Men so kom oljan rættiliga fyri seg, og torv datt burtur sum brenni, og síðsti kubbin varð framleiddur í 1966.

Ein bólkur av søguáhugaðum, Moselauget, hevur síðani roynt at varðveita verksmiðjuna sum savn ella til mentunarligt virksemi. Men hetta krevur nógvan pening, og hann er ikki lættur at reisa. Og tí er verksmiðjan í dag nærum ein toft.

Men Moselauget skipar á sumri fyri torvskering á gamla hátt, sum áhugaði so kunnu síggja. Hetta gevur møgleika fyri at síggja torvskurð, sum hann hevur verið praktiseraður til allar tiðir. Hetta kundi kanska eisini verið eitt husgkot her í Føroyum.

## Tíðindaskriv:
## NMF fund í Havn

Nordisk Maskinbefelsfederation NMF, ið er felagsskapur fyri norðurlendsku maskinmeistarafeløgini hevði fund í Havn 1. og 2. mai.

NMF umboðar tilsamans umleið 20.000 maskinmeistarar.

Við støði í teimum mongu skipum, ið síggjast uppankraði í Nólsoyarfirði og aðrastaðni í Norðanlondum, varð spurningurin um sokallaði substandard skip – tað eru skip í vánaligum standi – umrøddur, og semja var um, at tað er ynskiligt, at altjóða flutningsarbeiðarafelagsskapurin ITF setir eitt eftirlitsfólk til at kanna tey arbeiðisligu og sosialu viðurskiftini umborð í hesum skipum.

Av royndum við líknandi skipum aðrastaðni og við kanningum umborð, er NMF kunnað um, at viðurskiftini umborð á nógvum slíkum skipum ikki eru nøktandi, og hetta er orsøkin til, at heitt verður á ITF um at kanna viðurskiftini nærri.



**Besøg et arbejdende tørveskær ...**

En kreds af historisk interesserede har oprettet et Moselaug med det formål at bevare historiske værdier omkring tørve- og briketfabrikationen. Blandt Moselaugets medlemmer findes personer, som har haft nær tilknytning til mosen og arbejdet her, og en del gamle maskiner, redskaber og fotos er forlængst i laugets varetægt ligesom der er visse planer med den gamle fabriksbygning. Denne ligger i dag som et dystert minde om en svunden tid.

*Onsdagene den 10., 17. og 24. juli kl. 19-21* inviterer Moselauget publikum til at besøge et arbejdende tørveskær. Her bliver der bl.a. demonstration af de fleste kendte tørveredskaber ligesom der bliver lejlighed til at se tørvefolket i arbejde.Det tidligere moseområde er absolut et besøg værd. Store dele af dette ligger i dag hen som et meget smukt naturområde. Her kan især et besøg i Sandmoseområdet anbefales. Pandrup kommune har her anlagt stisystemer, så publikum kan færdes næsten overalt og få en virkelig stor naturoplevelse med sig hjem. Beskrivelse og kort over området kan fås på turistkontoret.

*Hetta kundi kanska eisini verið eitt hugskot í Føroyum.*




# Guð avger vitjanartíðina

**"Harrin læt aftur eftir honum"**
***1 Mós. 7,16***

Guð hevur altíð rætt. Hann er óskiljandi í sínum kærleika, í sínum heilagleika og í síni vreiði.

Eitt tað týðiligasta dømi um tað er tað, sum hendi við Nóa og samtíð hansara.

Syndin var stór og ræðulig á døgum Nóa. Tað stendur um Guð: "Tá iðraði Harrin seg um at hava skapað menniskjuna á fold; og tað neit hann í hjartað."

Guð avgjørdi tá at oyða alt lív á jørðini við eini vatnflóð. Vanliga verður hendingin rópt "Syndaflóðin".

Guð gav Nóa boð um at byggja sær eitt stórt skip – eina ørk. Ørkin skuldi bjarga Nóa og familju hansara, tí hann var ein rættvísur maður, sum gekk við Guði.

Samstundis skuldi ørkin bjarga teimum dýrum, Guð bað Nóa taka við sær inn í ørkina. Skrivað stendur: "Nóa so gjørdi; hann bar seg at í øllum lutum eins og Guð hevði boðið honum."

Bíbliugranskarar meina, at Nóa var 480 ára gamal, tá Harrin gav honum boð um at byggja ørkina. Skrivað stendur, at hann var 600 ára gamal, tá hann fór inn í ørkina saman við familjuni og dýrunum. So stendur so rámandi: "Og Harrin læt aftur eftir honum."

Sostatt tók tað umleið 120 ár at byggja ørkina. Nóa ikki bara smíðaði øll hesi árini, hann boðaði eisini Guðs orð. Pætur kallar Nóa fyri "rættferðarboðaran". 2. Pæt. 2,5

Úrslitið av boðanini kann ikki sigast at vera stórt. Átta sálir bjargaðust. Sostatt kendi fólkið á døgum Nóa ikki vitjanartíð sína, tíverri.

Hevði Nóa sjálvur latið hurðina í ørkina aftur eftir sær, so hevði tað óivað verið freistandi hjá honum at opna hana aftur og roynt at bjarga nøkrum frá at drukna. Men - Harrin læt aftur eftir honum.

Vitjanartíðin, náðitíðin og frelsumøguleikin var, meðan hurðin var opin.

Guð letur seg ikki spotta. Hann ger einsamallur av, nær vitjanartíðin er – eisini í dag. Skulu vit frelsast, má tað vera, meðan Jesus er nær. Tá er vitjanartíðin, náðitíðin. Tað er eingin ævinleiki yvir vitjanartíðini.

Ger tí sum Nóa og hansara gjørdu. Gakk inn í ørkina, meðan hurðin er opin. Í dag er Jesus vegurin inn í ørkina, hurðin inn í ørkina, ja, hann er sjálv ørkin – Guðs bjargingarskip.

Tú kemur inn í ørkina – Jesus – við at trúgva á hann, við at taka ímóti honum – við at játta syndirnar fyri honum. Ver so verandi í Ørkini!

*Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri,*
*vilt tú vanvirða tey boðini sæl?*
*Hann hevur elskað, teg elskað til deyða,*
*gev honum hjartað, hann vil tær tað væl!*
*Ms.298*


Línubustir og goggar
Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar
Verða sendar um alt landið
**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97
Fløttislið (limur í Føroya blindafelag)



Føroya største úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir
Vit útvega eisini:
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari
... sjálvandi til besta prísin !!
DANAK Reg.nr. 5001 Kvalitetsstyringssystem certificeret i henhold til DS/EN ISO 9001 af Det Norske Veritas, Danmark A/S
DNV
FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com





*Hetta er tíðarritið Arbeidsliv i Norden, sum greiðir frá arbeiðsmarknaðarviðurskiftum í Norðanlondum. Tó eru Føroyar ikki rættiliga komnar uppí part. Men hetta fer at henda nú.*

# Arbejdsliv i Norden til Føroya

Berit Kvam, blaðstjóri á tíðarritinum Arbeidsliv i Norden, kom til Føroya mánadagin 5. mai og steðgaði her til sunnudagin 11. mai. Við í ferðini var eisini Gunhild Wallin, sum er blaðfólk á tíðarritinum. Endamálið við ferðini er, at gera eitt temablað um arbeiðsmarknaðarviðurskifti í Føroyum.

Tær báðar hava havt fundir við myndugleikar, stovnar, feløg, og týsdagin í farnu viku vóru tær inni á gólvinum hjá Føroya Fiskimannafelag, har tær fingu eina gjølla kunning um umstøðurnar hjá fiskimonnum. Tær ynsktu eisini at hitta veruligar fiskimenn, og FF fekk skipað fyri, at tær hósdagin vóru á Eiði í hesum ørindum.

Fríggjadagin hittu tær Bjarna Djurholm, landsstýrismann í arbeiðsmarknaðarmálum.

Um tíðarritið Arbejdsliv i Norden er at siga, at hetta er tíðarrit fyri arbeiðsmarknað og arbeiðsumhvørvi. Arbejdsforskningsinstituttet í Oslo gevur ritið út fyri Nordisk Ministerråd.



*Her síggja vit Berit Kvam, t.v. og Gunhild Walin inni á skrivstovuni hjá FF.*


P/f Jógvan Weihe
Heil- og smásøla
Bjálvaðir ískassar á goymslu
70 ltr.
200 ltr.
450 ltr.

Ísurin heldur sær í 40 dagar
Betri góðska - betri prísur
Staravegur 15 · Tlf: 31 38 97 · Fartlf: 21 38 97 · Fax: 31 38 83
T-postur: jwimport@post.olivant.fo · Heimasíða: www.jogvan-weihe.fo








FF-blaðið
Vitja heimasíðuna
www.fiskimannafelag.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna - Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569




Maðurin sat spentur á føðigondini og bíðaði:
– Verður tað ein genta? Spurdi hann.
– Tað er ikki sikkurt. Fyri tað um tú bíðar í fleiri tímar, er tað ikki givið, at tað verður ein genta…

*****

Hví eru bara kavamenn til – og ikki kavakonur? Tí bara menn eru so býttir, at teir vilja standa uttanfyri allan veturin…

*****

*Í skúlanum…*
– Per! Hví kemur tú nústani?
– Eg datt út gjøgnum vindeygað á 3. hædd.
– Tað kann ikki taka so langa tíð, ha?

*****

Hvat rópar mann ein giraff, sum hevur vatt í oyrunum?
– Hvat sum helst – hann hoyrir teg ikki allíkavæl!!!

*****

Hvat er munurin á einum kameli og einum bryggjaríarbeiðara?
– Kamelurin kann arbeiða í 14 dagar uttan at drekka.
– Bryggjaríarbeiðarin kann drekka í 14 dagar uttan at arbeiða.

*****

*Mark Twain skal hava sagt:*
Tá eg var 14 ár, ógvaðist eg yvir, hvussu býttur pápi mín var. Men tá eg var 21, undraðist eg á, hvussu nógv hann hevði lært seinastu 7 árini.

# Pávin á Syðradali

Syðradalur á Kalsoynni er ein tann minsta bygdin í landinum. Tað eru bert tvær familjur, sum búgva fast her. Men á sumri er nógv fólk. Tess meira einsligt kann tað vera á vetri.

Sambandið til Klaksvíkar er gott, tað tekur bert 20 minuttir við "Barsskor". Tað verður enn betri, tá ferjulegan kemur, sum fer at geva allari Kalsoynni framúr samband.

Syðradalur og Húsar eru ein kommuna. Skúli er í báðum bygdum, og tað verður skift um at hava skúla í báðum bygdunum. Hetta merkir nógv ikki minst fyri Syðradal, tí við skúla aðra hvørja viku verður tað minni einsligt við tí lívi í bygdini, sum ein skúli gevur.

Vit vóru um dagarnir inni hjá Eriki og Paulinu Eliassen á Syðradali. Erik arbeiðir á smoltstøðini í Knútsdali millum Syðradal og Húsar. Paulina er fitt í hondunum og kann gera alt handligt. M.a. broderar hon føroysk klæði fyri fólk. Hon undirvísir eisini í hondarbeiði í Kollafirði. Hetta letur seg væl gera við teimum samferðslumøguleikum sum eru.

Tey bæði eiga tvey børn. Tað er tann 13 ára gamla Jana Maria og tann 15 ára gamli Andreas. Hann er tann fyrsti, sum hevur tikið 9. flokk í sjálvari Kalsoynni, og sum hevur gingið øll árini í skúla í oynni. Takkað verið skúlasamstarvinum í sóknini hevur hetta verið møguligt. Tí hava eisini verið tveir lærarar við skúlarnar. Foreldrini eru sera fegin um hendan møguleikan at varðveita børnini longri í oynni, og er hetta Torbjørn Jacobsen fyri at takka. Hann skal nu eisini eiga rós, tá hann hevur tað uppiborið!


*Her síggja vit Andrias saman við foreldrunum Poulinu og Eriki. Andreas eigur autograf frá sjálvum pávanum. Hann sendir brøv í allar ættir við umbøn um autograf. Og heilt væl kemur burtur úr.*

Ein vællærugrein er landbúnaður, og hetta dámar Andreasi sera væl. Og í Kalsoynni ber væl til at síggja landbúnað í verki. Nú um dagarnar vóru tey á Trøllanesi og vitjaðu Eyðun Eliassen og hansara bóndaskap.

Men nú ætlar Andreas sær á kokkaskúla í Klaksvík. Hetta fekk hann góðan hug til eftir at hava verið í praktikk í køkinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hetta ber eisini væl til við at ferðast ímillum. Andreas ætlar at vera verandi á Syðradali. Spurningurin er bert, um hann til sína tíð kann fáa eina gentu ella konu til at vilja tað sama!

Hvat fær so ein 15 ára gamal drongur á Syðradali tíðina at ganga við, nú tað t.d. ikki slepst so lætt á diskotek?

Umframt at hann hjálpir til við øllum arbeiði heima, so savnar hann autografar, ella undirskriftir, frá kendum fólki um allan heim. Andreas hevur fleiri bind av autografum. Nógvar av teimum eru frá fótbóltsspælarum, sum ikki siga FF-blaðnum nakað serligt. Men so eru eisini aðrir, hvørs undirskrift liggur á Syðradali. Ein av teimum er frá ikki minni enn sjálvum pávanum. Ein onnur er frá Tony Blair. Hettu eru jú ikki hvør sum helst.

Fleiri danskir politikkarar eru eisini í savninum. Ein er frá Anders Fogh Rasmussen og ein onnur frá hansara avbjóðara í starvinum Mogens Lykketoft.

Her eru eisini fleiri føroyingar ímillum. Og summir av teimum senda fitt fylgibrøv, sum eisini verða varðveitt í savninum. Eitt er t.d. frá Jens Paula Heinesen, har hann greiðir frá um verfaðirin, sum var av Syðradali. Eitt annað er frá Ingálvi av Reyni, sum eisini greiðir frá sínum sambandi við Kalsoynna.

Hetta er eitt ítriv, sum ikki setur nakrar avmarkingar. Andreas eigur inntil nú einar 300. Men uttan mun til hvussu nógvar autografar ið verða fingnir, so er hetta bert ein dropi í havninum av tí tilfeingi, sum er.

Víst ber til at vera ungur á smáplássi.


*Sjálvt frá pávanum hevur Andreas fingið autograf.*

dagsins **MYND**

## 32 ár við "Barsskor"

Tað man vera fáur, sum kennir Kalsoynna so væl sum Hjalmar Waag Høgnesen. Hann er í dag pensjonistur, men í ikki færri enn 32 ár sigldi hann við "Barsskor" í Kalsoynna og Kunoynna. Hóast "Barksskor" ikki eru nakar luksusfar, so er tað ikki nógva staðni, at tað er hendar so nógvar broytingar í samfersluni, sum júst tað sum Hjalmar hevur upplivað.

Tann rutan, Hjalmar sigldi fyrstu nógvu árini, var: Klaksvík, Syðradal, Húsar, Kunoy, Mikladal, Trøllanes, Mikladal, Kunoy, Húsar, Syðradal og so aftur á Klaksvík. Í dag verður bert siglt á Syðradal.

Tað var stundum buldrasligt í gomlum døgum, ikki minst á Trøllanesi. Ofta mátti vøran stjórast í land. Tá kundi henda, at børn vórðu koyrd í ein postsekk fyri betur at tryggja, at tey komu heilskapað umborð ella í land!

